# Avgerð Kappingarráðsins tann 24. juli 2023




# Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini

Kappingareftirlitið

Mál nr. 21/00313

24. juli 2023

# Yvirlit

1. Samandráttur....2
1.1. Avgerð....2
2. Málslýsing....3
2.1. Inngangur....3
2.2. Partarnir....5
2.3. Marknaðarlýsing....6
2.4. Atburðurin....8
2.5. Hoyring....8
2.5.1. Málsgongdin....8
2.5.2. Heimildin....10
2.5.3. Skilmarking av marknaðum....11
2.5.4. Margin squeeze skal vera egnað til at avmarka kappingina....12
2.5.5. Boð eftir §22 í kappingarlógini....15
2.6. Framløga á fundi í Kappingarráðnum....17
2.6.1. Veruligir feilir í málinum....18
2.6.2. Føroya Tele eri ikki ráðandi á viðkomandi marknað....21
2.6.3. Manglandi heilmild fyri tilmæltu boðunum....23
3. Meting....25
3.1. Viðkomandi marknaður....25
3.1.1. Viðkomandi vørumarknaður....25
3.1.2. Viðkomandi landafrøðiligur marknaður....27
3.1.3. Ávegis niðurstøða um viðkomandi marknaðir....27
3.2. §11 í kappingarlógini....27
3.2.1. Ráðandi støða....27
3.2.2. Misnýtsla....28
3.2.3. Ávegis niðurstøða um misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu....35
4. Samlað niðurstøða....37
5. Boð....37
6. Kæruvegleiðing....38

# 1. Samandráttur

1. Felagið Tosa byrjaði tingingar við Føroya Tele tann 23. mars 2016 um eina MVNO avtalu við Føroya Tele.[1]

2. Felagið Tosa sleit tingingarnar tann 4. september 2017, tí Føroya Tele helt fast um nakrar prísir, sum vóru órímiliga høgir.

3. Kappingareftirlitið hevur kannað, um talan var um eina prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

4. Ein prísklemma er t.d. tilstaðar um ein fyritøka, sum hevur eina marknaðar ráðandi støðu á einum heilsølu marknað, setur heilsøluprísin somikið høgt, at fyritøkur, sum bæði eru kundar og kappingarneytar, ikki kunna kappast við ráðandi fyritøkuna innan smásølu, hóast tær eru líka effektivar.

5. Kappingareftirlitið hevur kannað, um FT Samskifti hevði kunnað rikið sítt fartelefon virksemi við teimum prísum, sum Føroya Tele helt fast um, tá ið Tosa sleit tingingarnar tann 4. september 2017.

6. Kappingareftirlitið hevur brúkt tann leist, sum hægstirættur í ES hevur viðmælt at brúka. Nevniliga at taka støði í kostnaði og viðurskiftum annars hjá ráðandi fyritøkuni.

7. Kanningin hjá Kappingareftirlitinum vísir, at FT Samskifti hevði ikki megnað at rikið sítt virksemi við teimum prísum, sum Føroya Tele bjóðaði Tosa.

## 1.1. Avgerð

8. Kappingarráðið hevur tikið avgerð um at:

- P/f Telefonverkið hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við, at hava brúkt prísklemmu ímóti felagnum Tosa í sambandi við tingingar um eina MVNO-avtalu.
- geva P/f Telefonverkinum boð eftir §22 í kappingarlógini um, at FT Samskifti skal almannakunngera eitt tilboð um eina standard Full-MVNO avtalu og eitt tilboð um eina Brand Reseller-avtalu.
- tilboðini skulu góðkennast av Kappingareftirlitinum, áðrenn almannakunngerð.
- tilboðini skulu verða Kappingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi tveir mánaðir eftir avegerð er tikin um brot á §11, stk. 1 í kappingarlógini.
- tilboðini hava gildið í tvey ár frá tí tey eru almannakunngjørd.

[1] Tosa var stovnað 20. mars 2018, t.v.s. eitt ár eftir at samráðingarnar millum Føroya Tele og [umboð fyri stovnararnar av Tosa], slitnaðu. Í hesum tilmælið verður heiti Tosa brúkt, í sambandi við tær tingingar sum vóru millum undangongurmennirnar handan felagið sum seinni var stovna sum Tosa og Føroya Tele.

# 2. Málslýsing

## 2.1. Inngangur

9. Málið snýr seg um, at Føroya Tele í tíðarskeiðinum 2016 til 2017 hevur brúkt prísklemmu[2] í tinginingum millum Føroya Tele og Tosa.

10. Ein prísklemma er t.d. tilstaðar, um ein fyritøka, sum hevur eina marknaðar ráðandi støðu á einum heilsølu marknað, setur heilsøluprísin somikið høgt, at fyritøkur, sum bæði eru kundar í heilsøluliðnum og kappingarneytar í smásøluliðnum, ikki kunna kappast við ráðandi fyritøkuna innan smásølu, hóast tær eru líka effektivar.

11. Talan er sostatt um eina støðu, har munurin millum innkeypsprís og søluprís gerst ov lítil.

12. Tann 23. mars 2016 vendir ein ráðgevi hjá Tosa sær til Føroya Tele við boðum um, at felagið ynskir eina MVNO-avtalu við Føroya Tele.[3] Tann 7. apríl 2016 sendur ráðgevin eina skitsu til Føroya Tele yvir tað, sum Tosa hevur ætlanir um at gera og leggur dent á, at Tosa einans ynskir atgongd til RAN[4] hjá Føroya Tele, tí Tosa hevur egna kjarnu.[5]

13. Tann 14. oktober 2016 rykkir Tosa eftir prísum og Føroya Tele svarar, at hesir koma í vikuni.[6] Tosa rykkir tann 26. oktober[7] og 31. oktober 2016 eftir prísum.[8] Føroya Tele svarar tann 31. oktober, at prísirnir koma seinni í vikuni.[9] Tann 20. desember 2016 rykkir Tosa aftur eftir prísum.[10] Tann 3. januar 2017 boðar Føroya Tele frá, at prísirnir koma við endanum av mánaðinum.[11] Tann 24. januar 2017 rykkir Tosa enn einaferð eftir prísum.[12]

14. Tann 6. februar 2017 komu fyrstu prísirnir frá Føroya Tele.[13] Prísirnir koma frá [leiðslupersóni] á Føroya Tele. Tosa metir prísirnar vera óveruliga dýrar og púra órímiligar og sendir tí tann 1. mars. 2017 eina kæru til Fjarskiftiseftirlitið.[14] Fjarskiftiseftirlitið heitir á partarnar um at fara undir veruligar samráðingar.[15]

15. Niðanfyri eru teir prísir, sum Føroya Tele bjóðaði Tosa tann 6. februar 2017:

| Íverksetan og tilrættarlegging (Kr.) | Mánaðarligur Rakstrarkostnaður (kr.) | MSISDN (Kr. pr. eind) | Tala (kr. pr. min) | SMS (kr. pr. sms) | Data (kr. pr. MB) |
|---|---|---|---|---|---|
| [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] |

[2] á enskum: margin squeeze
[3] Skjal 22/00186-3 ([ráðgevi hjá Tosa], teldupostur tann 23. mars 2016)
[4] Radio Access Network
[5] Skjal 22/00186-3 ([ráðgevi hjá Tosa], teldupostur tann 7. apríl 2016)
[6] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 14. oktober 2016)
[7] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 26. oktober 2016)
[8] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 31. oktober 2016)
[9] Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], teldupostur, tann 31. oktober 2016)
[10] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 20. desember 2016)
[11] Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], teldupostur, tann 3. januar 2017)
[12] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa]; teldupostur, tann 24. januar 2017)
[13] Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], teldupostur, tann 6. februar 2017)
[14] Skjal 17/00076 ( [umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 5. desember 2016)
[15] Skjal 22/00186-3 ([starvsfólk á Fjarskiftiseftirlitinum], teldupostur, tann 29. februar 2017)

16. Tann 31. mars sendir Tosa teldupost til [leiðslupersón í Føroya Tele samtakinum] við umbøn um fund, vísandi til avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum.[16]

17. Tann 6. apríl 2017 svarar P/f Net.[17] Skotið verður upp at halda fund tann 7. apríl. Tann 18. og 19. apríl sendir Tosa upplýsingar um teirra ætlanir til P/f Net.[18,19] Tann 24. apríl rykkir Tosa eftir svari.[20] Tann 26. apríl svarar P/f Net, at teir koma við einum uppskoti um eina viku.[21] Tann 3. mai. 2017 kemur Tosa, eftir umbøn frá P/f Net, við uppskoti um prísir.[22] Í talvuni niðanfyri síggjast hesir:

| MSISDN (Kr. pr. eind) | Tala (kr. pr. min) | SMS (kr. pr. sms) | Data (kr. pr. MB) |
|---|---|---|---|
| [.....] | [.....] | [.....] | [.....] |

18. Tann 5. mai 2017 boðar P/f Net frá, at teir koma við betri prísum í næstu viku.[23] Tann 9. mai 2017 kemur P/f Net við einum nýggjum tilboði.[24] Teir siga nú, at støði er tikið í galdandi prísum hjá einum av størstu veitarum í Danmark.

| TALA | | | | | | SMS | Data | | | | Sjókaðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Íverk-setan (kr.)** | Mðr. gjald (kr.) | Out. Kr./ min. | In. Kr./ min. | On-net calls Kr./ min. | Call setup charge kr./ kall | Kr./ eind | <1000 Kr/mb | >1000 Kr./ Mb. | >3000 Kr./ Mb. | >5000 Kr./ Mb. | Íverk-setan | Mðr. gjald |
| [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] |

19. Tann 22. mai 2017 svara Tosa.[25] Sagt verður, at prísirnir eru betri nú, men vísa á, at talan ikki er um prísir, sum eru í gildi í Danmark í dag. Talan er um prísir, sum vóru í gildi á danska marknaðinum í 2015. Tosa vísir á, at føroyska nýtslan av dáta síðani 2015, er økt við 150-170% og gongdin í Danmark hevur verið hin sama. Tosa biðir tí um, at tilboðið verður leiðrættað til eitt 2017 støði. Ítøkiliga biður felagið um:

| TALA | | | | | | SMS | Data | | Sjókaðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Íverksetan (kr.) | Mánaðar-gjald (kr.) | Out. Kr./ min. | In. Kr./ min. | On-net calls Kr./ min. | Call setup charge (kr. pr. kall) | Pr. boð (Kr. pr. boð.) | <1000 (Kr. pr. MB.) | >1000 (Kr. pr. MB.) | Íverksetan | Mánaðar-gjald |
| [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] | [.....] |

---

16 Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], tann 31. mars 2017)
17 Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], teldupostur, tann 6. apríl 2017)
18 Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 18. apríl 2017)
19 Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 19. apríl 2017)
20 Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 24. apríl 2017)
21 Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], teldupostur, tann 26. apríl 2017)
22 Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 3. mai 2017)
23 Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], teldupostur, tann 5. mai 2017)
24 Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], teldupostur, tann 9. mai 2017)
25 Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 22. mai 2017)

20. P/f Net svarar tann 31. mai 2017, at felagið undrast yvir, at Tosa vil hava prísir fyri talu og data, sum liggja undir tað benchmark, sum P/f Net hevur úr Danmark. P/f Net bjóðar í staðin eina avsláttarskipan.[26]

21. Tann 21. juni 2017 sendir Tosa ein teldupost til P/f Net, har sagt verður, at felagið hevur spurt seg fyri hjá TDC Wholesale. Tosa hevur fingið upplýst, at teir nú taka áleið [.....] oyra fyri megabýti sum grundupphædd. Tosa sendir eisini eitt dagført yvirlit yvir MVNO kostnaðir hjá TDC Wholesale til Føroya Tele.[27]

22. Tann 22. juni er fundur millum Tosa og Føroya Tele, har prísirnir verða umrøddir.[28] Føroya Tele lovar at koma við einum nýggjum uppskoti, har roynt verður at ganga ynskjunum hjá Tosa á møti.[29] Tann 28. august 2017 fær Tosa at vita, at man ikki ætlar at broyta nakrar prísir. Tann 4. september slítur Tosa samráðingarnar, tí man metir seg ikki hava møguleika at koma á mál.[30]

## 2.2. Partarnir

23. Føroya Tele samtakið er størsti og elsti fjarskiftisveitarin í Føroyum. Móðurfelagið í Føroya Tele samtakinum er P/f Telefonverkið, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin.

24. Móðurfelagið hevur sín uppruna í almenna stovninum Telefonverk Føroya Løgtings, sum hevði lógarmonopol í Føroyum at selja fjarskiftistænastur. Í sambandi við liberaliseringina, sum fór fram í 1997, varð virksemið hjá Telefonverk Føroya Løgtings lagt í partafelagið P/f Føroya Telefonverk.

25. Føroya Tele samtakið hevur á flestu marknaðum fyri smásølu av fjarskiftistænastum ein marknaðarpart, sum liggur omanfyri 70%. Einans á marknaðinum fyri fleirrás sjónvarp er marknaðarparturin lægri.

26. Samtakið hevur eitt av tveimum farnetum í Føroyum og hevur einasta fastnetið í Føroyum.

27. Niðanfyri er yvirlit yvir Føroya Tele samtakið og roknskaparligu úrslitini seinastu árini:

Mynd 2.2.1: Føroya Tele samtakið og roknskapartøl fyri tíðarskeiðið 2016 til 2021




| Samtak - mió. kr. | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 475 | 488 | 380 | 385 | 390 |
| EBITDA | 128 | 135 | 114 | 109 | 102 |
| Ársúrslit | 44 | 53 | 48 | 33 | 31 |
| | | | | | |
| Eginpeningur | 459 | 509 | 538 | 533 | 530 |
| Fíggjarjavni | 780 | 754 | 726 | 711 | 766 |
| | | | | | |
| Ársverk | 246 | 249 | 178 | 179 | 183 |

Viðm: Fallið í nettosøluni frá 2017 til 2018 kemur av at Føroya Tele samtakið í 2017 seldi meirilutan av partabrøvunum í P/f Formula.

[26] Skjal 22/00186-3 ([leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum], tann 25. mai 2017)
[27] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], tann 21. juni 2017)
[28] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 21. juni 2017)
[29] Skjal 22/00186-3 ([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 21. juni 2017)
[30] Skjal 22/00186-3([umboð fyri Tosa], teldupostur, tann 4. september 2017)

28. Tosa varð stovnað tann 3. apríl 2018 við endamálinum at hava í hondum og reka fjarskiftistænastu, umframt aðra vinnu, sum hevði samband við hetta virksemi.[31] Tosa kom inn á marknaðin í desember 2020, eftir at hava gjørt MVNO'avtalu við P/f Nema. Tosa fekk ikki neyðugu undirtøkuna og tann 25. mai 2022 fór felagið undir trotabúðarviðgerð.[32]

### 2.3. Marknaðarlýsing

29. Tað eru tvey farnet í Føroyum í dag. Feløgini P/f FT Samskifti og P/f Nema hava hvør sítt farnet. P/f Nema valdi í síni tíð at gera egið farnet, eftir at teirra tingingar við Føroya Tele ikki komu á mál.[33]

30. Talið av privat haldum innan fartelefoni er vaksið úr 40.180 til 44.186 í tíðarskeiðinum 2015 til 2020. Sum tað framgongur av talvuni, so hevur Føroya Tele fingið fleiri hald í tíðarskeiðinum, meðan Nema hevur færri hald. Gongdin hevur verið samstundis sum samlaða talið av haldum er økt.

| Hald | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroya Tele | 28.284 | 29.446 | 30.798 | 31.709 | 29.567 | 33.515 |
| Nema | 11.896 | 11.671 | 11.879 | 10.992 | 11.122 | 10.671 |
| Í alt | 40.180 | 41.117 | 42.677 | 42.701 | 40.689 | 44.186 |

31. Verandi feløg á marknaðinum hava rættiliga eins príspolitikk. Bæði feløg hava sokallaði familjuhald.[34] Talan er um eina avsláttarskipan, har fyrsti familjulimurin rindar fullan prís, meðan fylgjandi familjulimir fáa ein avsláttur.

32. Niðanfyri er ein sundurliðing av familjuhaldinum hjá Føroya Tele, sum vóru á marknaðinum um tað mundi, tá Tosa var í tinginum við Føroya Tele.

| Hald | Brúkari 1 | Brúkari 2 | Brúkari 3 | Brúkari 4 | Brúkari 5 | Brúkari 6 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ver 0GB | 157 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |
| Ver 6GB | 247 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |
| Ver 16GB | 297 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |
| Ver 26GB | 347 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |

33. Sum tað framgongur, so rindar fyrsti kundin ein prís, sum er treytaður av hvussu nógv dáta skal verða á familjuhaldinum. Fyri eitt 6GB hald, rindar fyrsti kundin 247 kr., meðan fyrsti kundin rindar 297 kr. fyri 16GB. Prísurin hækkar fyri fyrsta brúkaran, tess meiri dáta kemur á haldið, men prísurin fyri hvørt GB fellur.

34. Upphæddin, sum brúkari 2 til 6 rinda, er óheft av nøgdini av dáta. Brúkari 2 rindar 117 kr., brúkari 3 rindar 47 kr. og brúkarar 4 til 6 rinda 17 kr. Tað er greitt av omanfyristandandi sundurliðing, at

---

[31] Skráseting Føroya, j.nr. 18-185, skrásett 3. apríl 2018
[32] Skráseting Føroya, j.nr. 22-455, skrásett 14. juni 2022
[33] Bjarnason, B.A. (2014), úr: "Kjak um liberalisering av fjarskiftismarknaði", Ráðstevna um kapping á smáum marknaðum, https://www.kapping.fo/fo/kunning/radstevnur
[34] Familjuhald og hald sambært fjarskiftisreguleringini eru hvør sítt. Eitt familjuhald er ein avsláttarskipan, sum Føroya Tele og Nema brúka á privata fartelefoni marknaðinum, meðan síðstnevnda fylgir eini greiðari allýsing hjá ITU og fevnir um fartelefon nummur, undantikið rein dátahald nummur og telemetri nummur.

stakir brúkarar og smærri familjur rinda ein lutfalsligan høgan prís fyri síni hald, meðan størri familjur rinda lutfalsliga minni fyri síni hald.

35. Feløg kunna brúka slíkar støður til at koma inn á marknaðin við haldum, sum venda sær til stakar brúkarar og smærri familjur. Men um fortreytin er íløga í farnet, so er neyvan rúm fyri fleiri fyritøkum á marknaðinum. Ein fyritøka við egnum farneti skal hava munandi fleiri kundar fyri at fáa virksemið at bera seg, enn um hon sleppur undan hesi íløgu.

36. Í galdandi fjarskiftislóg[35] er áseting[36] , sum áleggur feløgum, sum eru eigarar av fjarskiftiskervum, at samráðast við feløg, sum ynskja sambinding og interoperabilitet. Ásetingin áleggur eina skyldu um at innganga í veruligar samráðingar við feløg, sum ynskja veitingar.

37. Fjarskiftislógin gevur sostatt fyritøkum møguleika at byrja virksemi innan smásølu av fartelefoni, uttan at gera stórar íløgur í egið farnet. Hesin møguleiki er við til at lætta um atgongdina til viðkomandi marknað.

38. Tað eru fleiri sløg av avtalum, sum kunna gerast millum eigarar av fjarskiftiskervum og feløg, sum ynskja at selja fjarskiftistænastur í smásølu. Typiskt verða hesar bólkaðar í Brand Reseller-, Light (Thin) MVNO, Medium (Thick) MVNO og Full MVNO. Niðanfyri er ein lýsing av innihaldinum av slíkum avtalum.

Mynd 2.3: Sløg av MVNO avtalum




Kelda: www.mvnoeurope.eu

39. Íløgukravið er minst hjá einum Brand Reseller og størst hjá einum Full MVNO og mótsatt hesum, so er handilsliga frælsið størst hjá einum Full MVNO og minst hjá einum Brand Reseller.

40. Ein Brand Reseller skal ikki gera nakra íløgu í fjarskifti. Hesin selur somu tænastur, sum eigarin av farnetinum selur, men undir egnum vørumerki. Eigarin tekur sær av øllum tættum, undantikið sjálvari søluni og marknaðarføringini hjá Brand Reseller.

[35] Løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022
[36] § 7, stk. 1

41. Í eini Light MVNO avtalu, tekur MVNO'arin sær vanliga av marknaðarføring, sølu, kundarøkt og fakturering.

42. Ein Medium MVNO keypir atgongd til farnetið, tað vil siga, RAN og kjarnu.

43. Ein Full MVNO keypir bara atgongd til RAN. Ein Full MVNO hevur í grundini sama frælsi sum kerviseigarin. Ein Full MVNO mennir egnar tænastur til smásølumarknaðin.

44. Tosa ynskti at verða Full MVNO, og ætlaði í tí sambandi at fáa avtalu í lag við Føroya Tele um at brúka RAN hjá Føroya Tele. Tosa ætlaði at byrja sølu av fartelefoni haldum til privat.

## 2.4. Atburðurin

45. Í uppskotinum, sum Føroya Tele lat Tosa tann 6. februar 2017, var kostnaðurin á data [.....] kr. fyri megabýti, sum svarar til [.....] kr. fyri GB. Her skal havast í huga, at Føroya Tele hevði ein LRAIC, sum var [.....] kr. fyri GB í 2018.[37] Her verður sostatt lagt **[150-200%]** kr. afturat í vinningi.

46. Tann 9. mai 2017 kom Føroya Tele við einum nýggjum uppskoti. Hetta var eftir at Fjarskiftiseftirlitið tann 29. mars 2017 gav Føroya Tele boð um, at veruligar samráðingar skuldu fara fram[38].

47. Í hesum uppskoti var prísurin á data stigvísur. Hægsta gjald var [.....] kr. fyri MB, ið svarar til [.....] kr. fyri GB. Prísurin var fyri nýtslu niðanfyri 1.000 GB um mánaðin. Um støði verður tikið í eini mánaðarligari miðalnýtslu fyri hvørt hald á 3GB, so var hetta prísurin fyri fyrstu 333 kundarnar hjá Tosa.

48. Lægsti prísur fyri haldið var [.....] kr. fyri MB, ella [.....] kr. fyri GB. Fyri at fáa henda prís, skuldi Tosa hava eina nýtslu á 5000 GB um mánaðin. Verður støði tikið í eini miðalnýtslu á 3GB um mánaðin, so skuldi Tosa hava minst 1.667 kundar fyri at fáa henda prísin.

49. Áðrenn Tosa varð tikið til trotabótarviðgerð, hevði felagið millum 800-900 kundar.

50. Tilboðið tann 5. mai 2017 var tað sama, sum Føroya Tele helt fast um á fundi tann 28. august 2017 og sum Tosa endaliga havnaði tann 4. september 2017.

## 2.5. Hoyring

51. P/f Faroe Law, Horten Advokatpartnerselskab og White Label Consultancy hava latið hoyringssvar vegna Føroya Tele. Hoyringssvarið er at finna sum fylgiskjal 7.2. til hetta tilmælið.

52. Í hoyringssvarinum verður komið inn á málsgongdina (2.5.1.), heimild (2.5.2.), skilmarking av marknaðum (2.5.3.), margin squeeze (2.5.4.), og boðini eftir § 22 í kappingarlógini (2.5.5.).

### 2.5.1. Málsgongdin

53. Í hoyringssvarinum verður sagt, at í málslýsingini í tilmælinum verður gongdin í málinum lýst soleiðis, at Føroya Tele, eftir at hava fingið ein greiða umbøn um atgongd, heldur enn at samstarva, valdi at seinka tilgongdini við ikki at svara umbønum frá umboðum fyri Tosa, og til síðst varð valt

[37] Skjal 21/00313-12 (LRAIC – útrokning)
[38] Skjal 17/00076-11 (Áheitan um at byrja reellar samráðingar um eina MVNO-avtalu)

at bjóða ein prís, sum var somikið vánaligur, at sjálvt ikki Føroya Tele hevði megnað at fingið rakstur í smásøluna við hesum prísi.

54. Til hetta er at siga, at Kappingareftirlitið hevur kannað um P/f FT Samskifti vildi kunna rikið sítt virksemi við tí prísi, sum P/f FT Samskifti helt fast um tann 28. juli 2017. Henda kanning er gjørd soleiðis, sum ásett er í reglubroti 41 í C-52/09 TeliaSonera. Hetta merkir, at Kappingareftirlitið hevur kannað eftir, um P/f FT Samskifti hevði megnað at rikið sítt smásøluvirksemi við teimum heilsøluprísum, sum P/f FT Samskifti sjálvt bjóðaði Tosa.

55. Ein prísklemma, margin squeeze, er eitt sjálvstøðugt brot á §11 í kappingarlógini, og tað er hetta, sum er málsevni í hesum máli. Kappingareftirlitið hevur ikki kannað um tað drál og aðrar forðingar, sum P/f FT Samskifti brúkti í sambandi við tingingarnar, eru at meta sum veitingarnoktan í stríð við §11 í kappingarlógini. Hetta er ikki málsevni í hesum máli.

56. Kappingareftirlitið hevur eina lýsing av tilgongdini í málinum, soleiðis sum hon er upplýst okkum av klagara. Henda lýsing er sum so ikki grundarlag undir málinum. Prísklemma er eitt sjálvstøðugt brot á §11 í kappingarlógini, meðan drál og líknandi forðingar vanliga verða bólkaðar undir noktan at veita, sum eisini kann verða brot á §11 í kappingarlógini.

57. Framferðin, sum mett er at verða í ósamsvar við §11 í kappingarlógini, er lýst í parti 2.4 í hesum tilmæli. Framferðin fevnir ikki um drál og líknandi forðing, men einans um prísklemmu.

58. Í parti 3 í hesum tilmæli er meting av hvørt framferðin, lýst í parti 2.4, er í stríð við §11 í kappingarlógini. Metingin í parti 3 hesum viðvíkjandi snýr seg bert um prísklemmu.

59. Tað er ikki óvanligt, at partar í einum máli kunnu hava ymiska áskoðan um hvat er farið fram í einum máli. Ein gjøgnumgongd av hoyringssvarinum og tí tilfari, sum er viðlagt, gevur tó ikki orsøk til at halda, at tey veruligu viðurskifti, sum eru lýst í málslýsingini, ikki eru røtt. Heldur er talan um tveir partar, sum hava ymiskar áskoðanir um hvat skal leggjast í hesi viðurskifti. Tá hetta er støðan og tá talan ikki er um viðurskifti, sum eru málsevni í hesum máli, metir Kappingareftirlitið tað verða óneyðugt at broyta málslýsingina.

60. Føroya Tele vísir á, at havast skal í huga at hetta var fyrsta áheitanin av slíkum slag, sum felagið hevur fingið, tí var avbjóðingin tað størri. Hugsanin er, at tá viðurskifti skulu avklárast á fyrsta sinni, fer gjarna meira tíð til hetta.

61. Kappingareftirlitið skal vísa á, at longu í byrjanini eftir frælsisgerðina av marknaðinum, royndi felagið P/f Kall at fáa avtalu í lag um atgongd til farnetið hjá FT Samskifti.[39] Men avgjørdi síðani at gera egið net. Somuleiðis skal vísast á, at møguleikin at fáa atgongd umvegis MVNO ella sum service provider, hevur verið í fjarskiftislógini síðani 1997. P/f FT Samskifti hevur sostatt havt rúma tíð til at fyrireika seg til at avgreiða slíka áheitan.

62. Føroya Tele vil vera við, at tingingarnar um ein endaligan prís um atgongd, blivu ongantíð fullførdar, tí umboð fyri Tosa valdu at slíta samráðingarnar, tí betri avtala kundi gerast við P/f Nema. Tí er tað ikki rætt, at FT Samskifti helt fast um ein ávísan prís. Tvørturímóti var FT Samskifti sinnað at tingast víðari.

---

[39] sí reglubrot 29 og fótnotu 33

63. Kappingareftirlitið metir, at tað er ikki ein fyritreyt fyri at staðfesta prísklemmu, at tingingarnar eru endaðar í semju. Um hetta var rættarstøðan, kundi tann marknaðar ráðandi bara hildið fast um ein alt ov høgan heilsøluprís fyri at umganga, at avtalan bleiv inngingin.

64. Kappingareftirlitið metir ikki, at prísklemmubrot eru avmarkað til tær støður, har veitarin hevur givið eitt tilboð og avtakarin hevur tikið av. Prísklemma kann eisini vera til staðar, tá avtakarin velur ikki at taka av tilboðnum. Føroya Tele skal halda kappingarlógina uttan mun til, um Tosa tekur av ella ikki. Fakta er, at FT samskifti hevði ikki megnað at rikið smásølu av fartelefoni til privat við tí prísi, sum TOSA fekk bjóðað.

65. Tað at FT Samskifti velur at bjóða eina prísskipan við rabattum, hevur ongan týdning, tí FT samskifti kann ikki, hóast munandi stórrakstrarfyrimunir, reka sítt virksemi á viðkomandi niðara marknað við tí grunnprísi, sum felagði bjóðaði TOSA.

### 2.5.2. Heimildin

66. Í hoyringssvarinum verður víst á, at Kappingareftirlitið ikki hevur tikið støðu til um eftirlitið hevur málsræðið í hesum máli, tí Fjarskiftiseftirlitið hevur longu viðgjørt málið eftir lógini um fjarskifti.

67. Sagt verður, at tá tað eru tvær lóggávur, kappingarlógin og fjarskiftislógin, sum regulera margin squeeze innan fjarskiftisøkið, so setur serlóggávan á økinum kappingarlógina til viks. Víst verður í hesum sambandi til § 2, stk. 2 í kappingarlógini.

68. Í fyrsta lagi skal vísast á, at § 2, stk. 2 í kappingarlógini sigur ikki, at kappingarlógin verður sett til viks av serlóggávu. Greinin sigur, at um ein kappingaravlaging er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering, so eru forboðini ímóti kappingaravlagandi avtalum og forboði ímóti misnýtslu av ráðandi støðu, ikki galdandi. Talan er sostatt ikki um eina áseting, sum setur kappingarlógina til síðis, einans tí at økið er regulerað. Kappingarlógin verður sett til viks um ein áseting í lóggávu so ella so er orsøk til kappingaravlagingina.

69. Í hesum ítøkiliga føri er ikki talan um, at fjarskiftislóggávan er orsøk til tað kappingaravlaging (margin squeeze) sum er farin fram.

70. TOSA kærdi tvær ferðir Fjarskiftiseftirlitið um samráðingarnar við Føroya Tele. Fyrsta kæran varð send í november 2016 og málsevnið var drál. Fjarskiftiseftirlitið tók avgerð tann 29. mars 2017 um at heita á partarnar um at byrja veruligar samráðingar og vísti í hesum sambandi til, at partarnir ikki muga drála ella krevja órealistiskar prísir, at enda varð sagt, at myndugleikin kundi áleggja skyldur um kervisatgongd um neyðugt.

71. Seinna kæran varð send tann 4. september 2017 og varð hon send eftir at TOSA hevði tikið avgerð um at slíta samráðingarnar við Føroya Tele. Kæran snúði seg um prísmismun, manglandi gjøgnumskygni, sami [leiðslupersónur] í heilsølu og smásøluliðinum og drál. Fjarskiftiseftirlitið tók avgerð tann 21. mars 2018 um at partarnir skuldu fara undir veruligar samráðingar og uttan óneyðugt drál. Sagt varð eisini, at um TOSA hevði viðvirkað til, at ein semja var funnin uttan óneyðugt drál, men at partarnir hóast hetta ikki vóru komnir á mál innan 4 vikur, kundi Tosa kæra málið av nýggjum til Fjarskiftiseftirlitið.

72. Fjarskiftiseftirlitið hevur sostatt ikki tikið avgerð um at margin squeeze er farin fram ella at brot er framt á áseting í fjarskiftislógini. Fjarskiftiseftirlitið hevur somuleiðis ikki góðkent ella álagt prísir, sum tingast varð um í hesum ítøkiliga máli.

73. Fjarskiftiseftirlitið hevur tvær reisur tikið avgerð um, at partarnir skulu fara undir veruligar samráðingar á einum handilsligum grundarlagi. Hetta er avgerð, tikin sambært § 7 í fjarskiftislógini. Fjarskiftiseftirlitið brúkti ikki tær heimildir, sum eru at finna í §8-16 í føroysku fjarskiftislógini.

74. Í hoyringsskrivinum verður víst til ein dóm úr hægsta rætti í ES, C-721/20, vísandi til at Kappingareftirlitið átti í øllum førum at kanna um eftirlitið hevur málrsræðið í hesum máli. Dómurin snýr seg um í hvønn mun nationalir dómstólar í ES høvdu rætt til at viðgera eitt mál um avgjøld innan jarnbreytaøkið eftir art. 102 í ES sáttmálanum. Ásetingin um misnýtslu av ráðandi støðu í samveldinum hevur beinleiðis virkna í limalondunum, men eftirlitsmyndugleikin hevði somuleiðis fingið beinleiðis heimild í ES lóggávu at góðkenna avgjøld. Niðurstøðan var, at eftirlitsmyndugleikin skuldi taka støðu til um avgjøldini vóru lóglig og síðani kundu dómstólarnir brúka art. 102 í máli um afturrindan av avgjaldinum.

75. Hesin dómur er tó ikki viðkomandi, tí hann snýr seg um at viðgera sama mál, t.v.s. støddina á einum ávísum avgjaldi.

76. Støðan í hesum máli er ein onnur. Málið hjá Fjarskiftiseftirlitinum snúði seg um at geva atgongd til triðja part á einum handilsligum grundarlagi. Málið hjá Kappingareftirlitinum er hvørt P/f FT Samskifti misnýtti sína ráðandi støðu, tá felagið helt fast um ein prís, sum felagið sjálvt ikki hevði megnað at kunna rikið sítt smásøluvirksemi við.

77. Tað hevur týdning her at viðmerkja, at prísklemma er eitt sjálvstøðugt brot á §11 og ikki sum t.d. er galdandi fyri drál, sum vanliga innganga í mál um veitingarnoktan í stríð við §11 í kappingarlógini.[40]

### 2.5.3. Skilmarking av marknaðum

78. Í hoyringssvarinum verður víst á, at skilmarkingin av viðkomandi marknað er ikki gjørd á ein nøktandi hátt. Sagt verður, at Kappingareftirlitið bert hevur skilmarkað ein heilsølumarknað og ongan smásølumarknað, hóast at síðstnevnda skilmarking er avgerandi fyri hvørjar inntøkur og útreiðslur eiga at innganga í greiningina av um ein misnýtsla eftir § 11 er farin fram.

79. Kappingareftirlitið hevur skilmarkað ein viðkomandi marknað til at vera marknaðurin fyri fullfíggjaðar MVNO-avtalur og hevur staðfest, at P/f FT Samskifti hevur eina ráðandi støðu á hesum marknaði.

80. Kappingareftirlitið hevur staðfest, at brotið er framt á marknaðinum fyri fartelefoni hald til privat, men hevði í fyrstu syftu ikki skilmarkað henda marknað eftir §5 í kappingarlógini. Kappingareftirlitið hevur nú í parti 3.1.1 og 3.1.2. skilmarkað viðkomandi vørumarknað og landafrøðiliga marknað fyri fartelefoni hald til privat.

[40] C-280/08 Deutsche Telekom AG v Commission, reglubrot 183

81. Kappingareftirlitið hevur somuleiðis tikið støðu til uppáhald hjá P/f FT Samskifti um, at fartelefoni til vinnu og fartelefoni til privat eru ein og sami marknaður. Støðutakan til hetta er at finna í parti 3.1.1 um viðkomandi vørumarknað.

### 2.5.4. Margin squeeze skal vera egnað til at avmarka kappingina

82. Í hoyringssvarinum verður komið inn á tær treytir, sum verða settar til nær ein margin squeeze er egnað til at avmarka kappingina, tá munurin millum innkeypsprís og søluprís framvegis er positivur.

83. Kappingareftirlitið fer ikki at gera viðmerkingar til tann partin av hoyringsskrivinum, tí verandi mál snýr seg um eina støðu, har munurin millum innkeypsprís og søluprís er negativur.[41]

84. Tá munurin millum innkeypsprís og søluprís er negativur, er sambært rættarpraksis prógv um, at prísklemman er egnað til at avmarka kappingina.[42]

85. Í hoyringsskrivinum verður hildið uppá, at prísklemman er ikki negativ. Sagt verður, at Kappingareftirlitið í sambandi við margin squeeze kanningina hevur gjørt fylgjandi mistøk:

- Útrokningin inniheldur bert avsláttur uppá talu og ikki data, hóast at tilboðið til Tosa innihelt ein avsláttur á data eisini.[43]
- Útrokningin viðvíkjandi eindarkostnaðinum viðv. talu, tí atlit eru ikki tikin til inngangandi trafik ella kall-kostnað.[44]
- Ávísir kostnaðir viðv. MVNO eru tiknir við tvær ferðir í útrokninginum í tilmælinum.
- VerSumHeima er ikki tikið við í útrokningina hjá Kappingareftirlitinum. Hvørki reiking ella uttanlanda samtalur eru við í útrokningini hjá Kappingareftirlitinum.
- Nýtsludáta er rættað soleiðis, at tað skal avspegla 2018. Men rættast var um nýtsla avspeglaði 2017, tá tingingarnar fóru fram.

86. Í hoyringssvarinum verður víst á, at verða hesar broytingar framdar, verður prísklemman positiv.

87. Kappingareftirlitið valdi upprunaliga at síggja burtur frá avsláttrinum á data, tí stigini í hesi avsláttarskipan eru somikið høg, at ein nýbyrjari fær ikki nakran munandi avsláttur fyrr enn hesin longu hevur fótað sær á marknaðinum. Kappingareftirlitið hevur tó valt at ganga áheitanini í hoyringsskrivinum á møti og eftirkannað hvønn týdning avslátturin hevur fyri málið.

88. Avsláttarskipanin sum FT Samskifti bjóðaði Tosa, var í grundini óviðkomandi fyri eitt felag, sum trínur inn á marknaðin, tí avsláttarstigin er alt ov brattur í mun til eitt felag, sum byrjar við ongum kunda. Í talvuni niðanfyri er avsláttarskipanin sett upp.

| Kostnaðar interval (DKK) | | Rabat | Rabat (DKK) | Rabat, tils. |
|---|---|---|---|---|
| [....] | [....] | [....] | [....] | [....] |
| [....] | [....] | [....] | [....] | [....] |

[41] Sí í hesum sambandi fylgiskjal 3: Um ávísar útrokningar í hoyringssvarinum hjá Føroya Tele
[42] C-52/09 TeliaSonera, præmis 73-74
[43] Sí fylgiskjal 3: Um ávísar útrokningar í hoyringssvarinum hjá Føroya Tele
[44] Sí fylgiskjal 3: Um ávísar útrokningar í hoyringssvarinum hjá Føroya Tele

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| [....] | [....] | [....] | [....] | [....] |
| [....] | [....] | [....] | [....] | [....] |
| [....] | [....] | [....] | [....] | [....] |
| [....] | [....] | [....] | | |

89. Frá 0 til [....] mió. kr. í kostnaði er ongin avsláttur, frá [....] mió. kr. til [....]. mió. kr. er ein avsláttur á [....]%, ið svarar til [....] kr. Kostnaður millum [....] og [....] mió. kr. gevur ein avsláttur á [....] kr. Ein kostnaður millum [....] og [....] mió. kr. gevur [....] kr.

90. Í hesum sambandi hevur Kappingareftirlitið kannað hvussu stóran part av marknaðinum ein líka effektivur MVNO skal hava fyri at fáa rakstur í sítt virksemi við teimum prísum, harundir avsláttur, sum P/f FT Samskifti bjóðaði beint áðrenn tingingarnar slitnaðu.

91. Kappingareftirlitið brúkti ein eindarkostnað fyri talu í upprunaligu útrokningini, sum var einfaldari enn tað, sum skotið verður upp í hoyringssvarinum. Orsøkin var heilt einfalt, at mett varð, at tann munur, sum víst verður á, hevði ongan týdning fyri samlaðu myndina. Kappingareftirlitið hevur tó valt at ganga áheitanini í hoyringssvarinum á møti.

92. Kappingareftirlitið er ikki samt við tí, sum stendur í hoyringssvarinum um at kostnaðir viðv. MVNO eru tiknir við tvær ferðir. Viðvíkjandi kostnaðar bólkinum "DATA: OPEX og løn", sum hildið verður uppá inngongur tvær ferðirnar, er sambært skjølunum frá FT Samskifti talan um OPEX í deildini Data, sum hevur internet um hendir. Atgongd til internet var ikki partur av MVNO-avtaluni hjá TOSA. Tí er ikki talan um kostnaðir, sum innganga tvær ferðir.

93. Viðvíkjandi kostnaðar bólkinum "Rakstur: OPEX og løn" er brúktur ein býtislykil á 25/75 og umhugsað varð at brúka 0/100, men grundað á eina varsemisreglu, varð valt at brúka 25/75. Tað vil siga, at FT Samskifti bar 25% av hesum kostnaði, meðan MVNO'arin bar 75%. Í hoyringssvarinum verður hildið uppá, at lutfallið er øvugt. Tað vil siga, at FT Samskifti ber 75% og MVNO'arin ber 25%. Í lýsingini av kostnaðar bólkinum er talan um skipanir til handfaring av fartelefoni haldum og skipan til handfaring av SMS-tænastum. Talan er sostatt um skipanir, sum koma undir endabrúkara fakturering. Kappingareftirlitið heldur tí fast um, at MVNO'arin ber í øllum førum 75% av hesum kostnaðum.

94. Kappingareftirlitið metir, at VerSumHeima er sjálvstøðug tænasta, sum kann veljast afturat einum familjuhaldi. Meðan data, tala og SMS eru buntað saman í einum familjuhaldi, har tað ikki er møguligt at velja eina av tænastunum frá og har buntið hevur ein prís, er VerSumHeima ein sjálvstøðug tænasta, sum brúkarin kann velja afturat haldinum ella lata verða.

95. Kappingareftirlitið er ikki samt við tí, sum stendur í hoyringsskrivinum um, at rætta tíðarskeiðið at brúka, átti at verið 2017, tí tingingarnar fóru fram tá. Seinastu tingingarnar millum partarnar vóru í august 2017 og umboð fyri TOSA hava greitt Kappingareftirlitinum frá, at felagið vildi kunna byrja sítt virksemi 3-6 mánaðir eftir at avtalan var gjørd. Umboðið segði beinleiðis ja til, at sannlíkt kundi byrjast 1. januar 2018. Umboð fyri TOSA segði somuleiðis, at avtalað varð við P/f FT Samskifti, at prísirnir skuldu verða galdandi í 12. mánaðir.

96. Kappingareftirlitið hevur tí valt at brúka árið 2018 sum grundarlag fyri útrokningini og tað verður hildið fast um. Tað er vælkent í fjarskiftisvinnuni, at seinastu árini er datamongdin økt alsamt. Hetta

hevur eisini verið at sæð í Føroyum, tí metir Kappingareftirlitið, at P/f FT Samskifti var væl fyri at meta um henda vøkstur. Afturat skal leggjast, at vøksturin millum 2017 og 2018 var væl lægri enn árini undan.

97. Í hoyringssvarinum verður sagt, at stórar broytingar vóru í nýtsluni av data árini 2016 til 2020 og at tað tí undir tingingum í 2016 til 2017 var stór óvissa um hvussu nýtslan fór at verða frameftir. Atfinningin er, at útrokningin hjá Kappingareftirlitinum leggur til grund, at P/f Føroya Tele longu medio august 2017 við vissu kundi siga hvat nýtslan fór at verða í 2018.

98. Tað er rætt, at Kappingareftirlitið leggur hetta til grund fyri síni útrokning. Talan er um vinnurekandi, sum tingast um eina avtalu innan sítt øki. Kappingareftirlitið metir, at Føroya Tele megnar at gera eina eftirfarandi meting av nýtsluni í einum 12 mánaðar skeiði, 6 mánaðir áðrenn hetta skeið byrjar.

99. Tað eru eisini møguligt hjá Føroya Tele at treyta ein prís.

100. Í hoyringssvarinum verður komið inn á, at gávan á 100GB, sum P/f FT Samskifti gav tann 25. apríl 2018 til allar verandi og nýggjar kundar at brúka fram til árslok 2018, kundi Føroya Tele ikki vera vitandi um, tá tingingarnar við Tosa vóru í gongd. Tí verður mett, at tað er ikki rætt at brúka nýtsluna íroknað gávuna í prísklemmu kanningini.

101. Kappingareftirlitið hevur í prísklemmu kanningini gjørt útrokning við støði í nýtsluni við og uttan gávuna. Í báðum førum var prísklemman negativ.

102. Í hoyringssvarinum verður ført fram, at Kappingareftirlitið hevur tikið inntøku frá ávísum haldum til privat (VER-haldum) og í avgerðini kallað hetta samlaða privata virkisøkið. Kærari er als ikki samdur við hesi skilmarking og metir, at Kappingareftirlitið átti at tikið inntøkur frá øllum haldum til privat og eisini vinnuhaldum.

103. Kappingareftirlitið er ósamt í tí, sum verður ført fram. Í fyrsta lagi hevur Kappingareftirlitið tikið støði í teimum haldum, sum vóru til sølu í 2018. Tey hald, sum víst verður til, eru hald, sum fyrr hava verið til sølu og har P/f FT Samskifti enn ikki hevur megnað at selt nýggju haldini, VER-haldini, til. Kappingareftirlitið metir, at útgangsstøðið fyri eini margin squeeze kanning, har AEC-testin verður brúkt, má vera inntøkur og útreiðslur fyri tær vørur, sum eru til sølu og sum tann líka effektivi kappingarneytin skal kappast við. Tað er prísurin og kostnaðurin fyri hesi hald, sum skal kannast.

104. Kostnaðar upplýsingarnar, sum eru brúktar í málinum, er tað, sum myndugleikin hevur fingið frá Føroya Tele. Viðmerkjast skal, at Føroya Tele í sambandi við hoyringina, hevur ikki brúkt høvi til at koma við øðrum og betri kostnaðar upplýsingum.

105. Ein kappingarmyndugleiki hevur avmarkaða ávirkan á dygdina á teimum upplýsingum, sum myndugleikin fær frá fyritøkuni í einum prísklemmu máli. Tí má kappingarmyndugleikin hava neyðugt rásarúm í sambandi við økonomiskar útrokningar.[45] Fyritøkan undir kanning kann avmarka rásarúmið við at koma við betri og meira fullfíggjaðum upplýsingum.

[45] C-12/03 Commission v Tetra Laval, reglubrot 28 og

106. Kostnaðar upplýsingar, sum eru komnar frá Føroya Tele, eru í eindini kr./GB, sum er ein eindarkostnaður. Tað vil siga, at P/f FT Samskifti hevur latið Kappingareftirlitinum upplýsingar um hvat nýtslan á einum haldi, uttan mun til um talan er um vinnuhald ella privat hald, og uttan mun til um talan er um stórt ella lítið hald, kostar fyri hvørt GB.

107. Kappingareftirlitið metir, at tað er ongin orsøk til at halda, at nýtslan á einum vinnuhaldi og privathaldi, ikki kostar tað sama at framleiða. Somuleiðis er við nýtsluni á einum stórum og lítlum haldi.

108. Undir øllum umstøðum eru hetta teir kostnaðar upplýsingar, sum P/f FT Samskifti hevur kunnað latið og P/f FT Samskifti hevur ikki í sambandi við hoyringina latið aðrar kostnaðar upplýsingar til Kappingareftirlitið.

109. Í kæruni verður skotið upp, at Kappingareftirlitið ger eina meira "holistiska" prísklemmu kanning fyri øll hald, bæði vinnu og privat hald, hjá P/f FT Samskifti. Í kæruni er ein roynd gjørd at gera slíka "holistiska" prísklemmu kanning og er hon positiv.

110. Kappingareftirlitið kann tó ikki brúka henda leist, tí í fyrsta lagi eru vinnuhald og privathald hvør sín marknaður og í øðrum lagi, so eru reiking og altjóða samtrafik tænastur ikki partur av viðkomandi vørumarkna. Ein útrokning fyri øll hesi vildi ikki verið í tráð við rættarvenjuna á økinum. Slík útrokning kann lættliga vísa, at ongin prísklemma er til staðar, hóast at ein negativ prísklemma er á eini tænastu, tí stórt yvirskot á øðrum tænastum kann fjala útyvir hetta.

### 2.5.5. Boð eftir §22 í kappingarlógini

111. Í hoyringssvarinum verður sagt, at Kappingarráðið hevur ikki heimild til at geva tilmæltu boðini og at boðini eru órímilig og ógreið. Somuleiðis verður mett, at kravið um, at Kappingareftirlitið skal góðkenna tilboðini, er sambært rættarvenju mett at vera óskynsamt og vandamikið inntriv.

112. Kappingareftirlitið hevur avgjørt at áleggja Føroya Tele at gera standard tilboð, sum skulu góðkennast av Kappingareftirlitinum og síðani almannakunngerast.

113. Tingingarnar millum Føroya Tele og Tosa hava víst, at slíkar tingingar kunna taka áravís, tí tær eru altíð "fyrstu ferð", men samstundis framgongur av samskiftinum, at báðir partar kunna innheinta tilboð uppá stutt skotbrá, bæði úr Danmark og Noreg.

114. Fyrstu ferð umboð fyri Tosa rykkja eftir prísum, er tann 14. oktober 2016 og fyrsta prísuppskotið kemur tann 6. februar 2017. Prísurin fyri data er áleið [100-50] kr. GB, ið er áleið [...] kr. omanfyri LRAIC. Næsta hálva árið royna umboð fyri Tosa at fáa prísin niður ímóti einum støði, sum svarar til tað, sum TDS Wholesale bjóðar sínum kundum, men prísurin kom sum skilst ongantíð niður á eitt støði, har ein líka effektivur kappingarneyti hevði kunnað rikið sítt virksemi á einum handilsligum grundarlagi.

115. Tað er greitt, at afturhaldni hjá Føroya Tele at innganga í tingingar við feløg, sum ynskja at trína inn á marknaðin og at bjóða ein prís, sum er handilsliga grundaður, hevur við sær, at atgongdin til marknaðin verður torførari.

116. Kappingareftirlitið hevur tí mett, at eitt krav um at gera eitt standard tilboð, sum skal góðkennast av Kappingareftirlitinum og síðani skal almannakunngerast, vil hjálpa uppá tann skaða, sum Føroya Tele hevur framt á marknaðinum.

117. Tað at tað liggur eitt standard tilboð klárt ger, at tann, sum vil trína inn á marknaðin, kann velja at taka av tilboðnum ella hava eitt betri útgangsstøði, um hesin vil hava eina øðrvísi avtalu. Hetta skuldi alt annað líka merkt, at feløg, sum trína inn á marknaðin, kunna gera hetta ómakaleysari enn fyrr.

118. Kravið um at Kappingareftirlitið skal góðkenna tilboðið, verður sett fyri at eftirlitið skal tryggja, at tær treytir, sum verða settar, her undir prís, ikki eru kappingaravlagandi. Tað vil geva lítla meining at áleggja FT Samskifti at gera eitt standard tilboð, um prísurin er 2-4 ferðir LRAIC. Minsta kravið má verða, at ein líka effektivur kappingarneyti sum FT Samskifti, klárar at reka sítt virksemi við tí prísi, sum FT Samskifti bjóðar.

119. Kravið um almannakunngerð, er fyri at lætta um atgongdina inn á marknaðin. Er standard tilboðið alment, er lætt hjá øllum, sum umhugsa at fara í hesa vinnu, at taka støðu til um ein møgulig innrás á marknaðin skal fara fram.

120. Kappingareftirlitið metir, at hesi boðini eru tað, sum skal til, fyri at rætta uppá ta avlaging, sum framferðin hjá FT Samskifti hevur viðført, samstundis sum at talan er um inntriv, sum ikki fara ov langt, tí talan júst er um eina fyritøku, sum longu er áløgd at tingast við partar á einum handilsligum grundarlagi.

121. Inntrivini eru ætlað at tryggja, at FT Samskifti ikki hevur møguleika at drála og at nokta atgongd við at byrja við prísum, sum eru óveruliga høgir. Við boðunum verður álagt FT Samskifti at hava eitt standard tilboð klárt, sum áhugaðir partar kunna velja at taka av ella brúka sum útgangsstøði fyri víðari tingingum.

122. Kappingareftirlitið metir, at boðini yvirhalda meginregluna um lutfall, tí tey eru neyðug, partvís fyri at tryggja, at tann viðferð, sum Tosa fekk, ikki endurtekur seg, og partvís sum eitt signal til ein hvønn, sum umhugsar at traðka inn á marknaðin, at viðurskiftini í sambandi við at byrja virksemi, vilja verða tryggari í framtíðini. Í hesum sambandi skal havast í huga, at talan er um eina marknaðar støðu, har tann marknaðarráðandi longu hevur eina serliga sterka marknaðar støðu, sammet við viðkomandi marknaðir í okkara grannalondum. Hetta bæði hvat viðvíkur stødd av marknaðarparti og tíðarskeiði, hesin marknaðarpartur hevur staðið í stað ella er øktur. Somuleiðis er galdandi, at royndin hjá Tosa at koma inn á marknaðin, var fyrsta roynd síðani fyrst í 2000, tá P/f Nema royndi at fáa avtalu í lag við Føroya Tele, men valdi heldur at gera egið farnet.

123. Gildistíðin er avmarkað til bert 2 ár og er hetta gjørt við atliti til meginregluna um lutfall. Varð t.d. talan um eini boð, har tilboðið ikki skuldi almannakunngerast, vildi gildistíðin verið longri.

124. Í hoyringssvarinum verður gjørt nógv burtur úr hvussu skaðilig prísinntriv eru, og víst verður til ávíst danskt mál, har danski kærumyndugleikin sigur, at prísinntriv eru sum meginregla skaðilig fyri kappingina og fyri virknaðin hjá fyritøkum. Somuleiðis verður víst á, at danski kærumyndugleikin valdi at strika boðini.[46]

125. Fyrst er at siga, at prísinntrivið hjá danska kappingarmyndugleikanum bleiv ikki strikað, tí tað var eitt prísinntriv. Talan var um umstøður, sum vóru serligar fyri júst hatta málið. Eitt sum taldi við hjá kærumyndugleikanum var, at kappingar umstøðurnar á viðkomandi marknað vóru broyttar

[46] Avgerð frá danska kærunevndini tann 14. november 2006 í máli 2005-0004688, síða 299

munandi í tíðarskeiðinum meðan danski kappingarmyndugleikin hevði viðgjørt málið. Ein av kappingarneytunum hjá Elsam hevði í tíðarskeiðinum keypt fleiri orkuverk frá felagnum.[47]

126. Danska kærunevndin segði í Elsam-málinum, at skulu prísinntriv brúkast, skulu marknaðar umstøðurnar verða heilt serligar og uttan virkna kapping og útlitini til økta kapping skulu ikki vera góð, t.d. tí at talan er um eina greiða marknaðarráðandi støðu, sum hevur verið leingi.

127. Umstøðurnar í hesum máli eru alt øðrvísi enn tær í Elsam-málinum og minna meira um tær, sum danski kærustovnurin lýsir í síni avgerð í Elsam-málinum. P/f Nema er í skrivandi løtu í gongd við at taka sítt radio access net niður og fer frameftir at verða kundi hjá P/f FT Samskifti í sambandi við at 5G tøknin verður sett í verk. Hetta ger, at P/f FT Samskifti fer at verða einasti kervisveitari í Føroyum.

128. Talan er tí um heilt øðrvísi umstøður, har vánirnar fyri kapping á kervisveiting ikki eru til staðar, meðan vánirnar fyri kapping í ávísan mun møguliga framvegis eru til staðar á niðaru marknaðum, men undir heilt øðrvísi umstøðum. Hetta, samstundis sum talan eru um ein heilsøluveitara, FT Samskifti, sum hóast liberaliseringin fór fram fyri meir enn 20 árum síðani og heilsøluveitarin í øll hesi ár hevur verið álagdur eina veitingarskyldu, framvegis ikki er vorðin til reiðar at veita fartelefoni tænastur í heilsølu.

129. Í hoyringssvarinum verður sagt, at boðini eiga at innihalda eina freist fyri nær tey skulu verða gingin á møti. Eini boð koma sum meginregla í gildi beinanvegin boðini verða givin, men undantaksvís kann ein freist ásetast.[48]

130. FT Samskifti har havt eina veitingarskyldu í meir enn 20 ár, tað vanliga vildi verið, at FT Samskifti longu hevði hesar tænastur klárar.

131. Kappingareftirlitið kann tó ganga við til, at FT Samskifti fær tveir mánaðir til at koma við sínum standard tilboðum. Í sambandi við hetta mál er komið fram somikið gott tilfar viðvíkjandi kostnaðinum hjá FT Samskifti, umframt hetta hevur FT Samskifti gjørt rættiliga nágreiniligar metingar av kostnaðinum í sambandi við skifti yvir til 5G, at tað eigur ikki at taka nógva tíð til at gera tílík tilboð.

132. Kappingareftirlitið hevur tí valt at áseta eina freist á 2 mánaðir í sambandi við boðini eftir § 22 í kappingarlógini.

## 2.6. Framløga á fundi í Kappingarráðnum

133. Fyritøkur sum ein avgerð viðvíkjur, hava rætt til at hava eitt stutt munnligt innlegg fyri Kappingarráðnum, áðrenn avgerð verður tikin í málinum, sbrt. §10, stk. 1 í kunngerð nr. 8 frá 13. mars 2008 um starvs- og fundarskipan fyri Kappingarráðið.

134. Umboð fyri Føroya Tele vóru á Kappingarráðsfundi tann 24. juli 2023. Umboð greiddi innleiðandi frá, at samráðingarnar millum FT Samskifti byrjaðu í 2016 og endaðu í 2017, men at tær útrokningar, sum gjørdar eru, byggja á nýggjari tøl, tí tølini fyri 2016 til 2017 eru ikki til longur.

[47] Avgerð frá danska kærunevndini tann 14. november 2006 í máli 2005-0004688, síða 300
[48] Konkurrenceloven med kommentarer, side 819

135. Umboðið vísti eisini á, at Kappingareftirlitið tók ikki málið upp fyrr enn í 2021 og at hóast FT Samskifti lat hoyringssvar inn tann 30. desember 2022, so verður tilmælið nústanni í juli 2023 lagt fyri Kappingarráðið.

136. Umboðið vísti á, at grein 6 í Evropeiska sáttmálanum um menniskjarættindi, ið snýr seg um rættin til eina rættvísa rættargongd[49]. Í hesum sambandi var víst til hugtakið "justice in due time", og segði umboðið at tá málsviðgerðin hevur tikið so langa tí, eigur hetta at innganga í metingina av um misnýtsla er farin fram.

137. Kappingareftirlitið hevur tikið hetta mál upp av egnum ávum, sum heimild eru fyri í §20, stk. 1 í kappingarlógini. Kappingareftirlitið tók málið upp í fyrsta ársfjórðingi 2022 og var sent í hoyring tann 13. oktober 2022. Kappingareftirlitið metir ikki at málsviðgerðin hevur tikið óvanliga langa tíð. Viðvíkjandi atfinningini um, at ov long tíð er gingin frá at hoyringssvarið var latið, til tilmælið var lagt fyri Kappingarráðið, skal vísast á, at hoyringssvarið var rættuliga rúgvusmikið og innihelt nógv økonomisk uppáhald, sum neyðugt hevur verið at kannað rættleikan av. Hetta tekur sjálvsagt nakað av tíð.

138. Umboðið greiddi frá, at Føroya Tele í framløguni fór serliga at koma inn á trý viðurskifti í tilmælinum, sum vóru: veruligir feilir í málinum(2.6.1.), at FT Samskifti ikki er ráðandi á viðkomandi marknað, at skilmarkingin av viðkomandi marknað er ófullfíggjað(2.6.2.) og at § 22 í kappingarlógini ikki heimilar tey boð, sum tilmæld verða (2.6.3.).

### 2.6.1. Veruligir feilir í málinum

139. Umboðið fyri Føroya Tele vísti á, at Føroya Tele hevði ikki fingið seinastu útgávuna av tilmælinum til hoyringar. Víst var eisini á, at man í hoyringsskrivinum hevði biðið um at verða hoyrdur aftur, um upplýsingar í teirra hoyringssvari vórðu brúktar til annað enn málsviðgerð í trúnað, harundir um upplýsingar verða latnar triðja parti ella vórðu almannakunngjørdar.

140. Umboðið vísti á, at vantandi hoyring kann verða ein grundgeving fyri ógildan og vísti í hesum sambandi á, at munnlig framløga eftir §10 í kunngerðini er ikki at meta sum ein hoyring.

141. Kappingareftirlitið hevur mett um hvørt tilmælið skuldi í hoyring aftur, og metti ikki, at hetta varð neyðugt, tí fyrra hoyringssvarið gav ikki orsøk til at gera stórvegis broytingar í tilmælinum. Framdar broytingar eru yvirhøvur, at ein stutt endurgeving av hoyringssvarinum eru at finna í parti 2.6., at skilmarking av einum niðari markna er at finna í 3.1. og meira greiðar freistir eru gjørdar í boðunum í part. 5. Umframt endurgeving av hoyringssvarinum, er bara talan um viðurskifti, har Kappingareftirlitið hevur heilt ella partvís gingið sjónarmiðum á møti hjá Føroya Tele.

142. Vanligu reglurnar um hoyring í §18 í fyrisitingarlógini áleggja myndugleika at hava partshoyring, tá tað má haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnugur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum og upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part, og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum.

---

[49] Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention

143. Kappingareftirlitið metir ikki, at tað eru upplýsingar av sovornum týdningi í málinum, sum eru komnar eftir seinastu hoyring. Í hoyringssvarinum[50] vóru ymisk uppáhald um, at útrokningin[51] hjá Kappingareftirlitinum ikki var nøktandi, millum annað, at ávísur avsláttur ikki var tikin við. Kappingareftirlitið lat sín ráðgeva gera nýggjar útrokningar, har farið varð í smálutir, men úrslitið var framvegis negativt og lítið broytt í mun til upprunaligu útrokningina.[52]

144. Kappingareftirlitið helt tí fast við upprunaligu útrokningina, partvís tí munurin var so lítil og tann avsláttarskipan, sum var tikin við, var somikið brøtt, at ein sum byrjar frá ongum, fær ongan fyrimun av henni. Við at halda fast um upprunaligu útrokningina, sleppist udan at taka støði til um sjálv avsláttarskipanin var í ósamsvar við §11 í kappingarlógini.

145. Í hesum sambandi skal vísast til §18, stk. 2, nr. 1, har sagt verður, at partshoyring ikki er neyðug um tað, soleiðis sum upplýsingarnar og málið er háttað, ikki kann metast at vera ivingarsamt, at taka avgerð í málinum á verandi grundarlagi.

146. Umboðið vísti á, at tað var ógreitt hvørjir viðkomandi partar eru í málinum. Í hesum sambandi varð víst til reglubrot 9 og reglubrot 28. Í reglubroti 9 verður víst á, at málið snýr seg um at FT Samskifti hevur brúkt prísklemmu mótvegis Tosa, meðan reglubrot 28 staðfestur, at løgfrøðiligi persónurin Sp/f Tosa varð stovnaður tann 3. apríl 2018.

147. Kappingareftirlitið skal vísa á, at longu á síðu 2 í tilmælinum er ein fótnota, fótnota 1, har sagt verður, at í hesum tilmæli verður heitið Tosa brúkt í sambandi við tær tingingar, sum vóru millum undangongumennirnar handan felagið, sum seinni varð stovnað sum Sp/f TOSA, og Føroya Tele.

148. Tað skal leggjast afturat, at hvørki Sp/f Tosa ella mennirnir handan felagið, eru partar í hesum máli. Talan er um eitt mál, sum Kappingareftirlitið valdi at taka upp til viðgerðar av eintingum í 2022.

149. Somuleiðis skal viðmerkjast, at tað eru eingi viðurskifti í hesum máli sum tala fyri, at tað skal leggjast nakar týdningur í um tingingarnar vóru við løgfrøðiligan persón ella fysiskar persónar.

150. Í eini prísklemmukanning verður hugt eftir um ein líka effektivur kappingarneyti sum ráðandi fyritøkan, kundi kappast í smásølu við teimum heilsøluprísum, sum ráðandi fyritøkan bjóðar. Sambært rættarvenju skal ráðandi fyritøkan sum meginreglu brúkast sum umboðandi fyri eina líka effektiva fyritøku.[53]

151. Hvørt tað vóru undangongumenn handan Sp/f Tosa ella ikki, hevur tí ongan týdning fyri um avgerðin er røtt ella ikki. Prísklemman er staðfest eftir røttum leisti, uttan mun til hvør hevur tingast við P/f FT Samskifti.

152. Umboðið fyri Føroya Tele greiddi frá, at talan var um samráðingar millum ráðgevarar og FT Samskifti og at felagið ikki var vitandi um hvørji ørindini hjá monnunum handan Tosa vóru. FT Samskifti varð ikki fyrr enn seinni varugt við, at talan var um privatpersón, sum ynskir at seta eitt nýtt telefelag á stovn.

---

[50] Fylgiskriv 7.2
[51] Fylgiskriv 7.1
[52] Fylgiskriv 7.3
[53] C-52/09 Konkurrensverket v TeliaSonera Sverige AB, reglubrot 40-42

153. Kappingareftirlitið metir ikki, at hetta er ein heilt røtt endurgeving av veruligu viðurskiftunum í málinum. Tann 23. mars 2016, kl. 13:51 fær [leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum] teldupost frá einum umboði fyri Simpl World Telcom, sum sigur, at han hevur ein kunda, sum gjarna vil vera MVNO í Føroyum.[54] Tann 6. apríl 2016 spyr [leiðslupersónurin í Føroya Tele samtakinum] um hvørjar MVNO tænastur biðið verður um.[55] Tann 7. apríl 2016 sendur ráðgevin eina skitsu yvir leistin, sum verður umbiðin, ítøkiliga verður nevnt, at man bara ynskir atgongd til radio access netið.[56] Alt annað vil ein MVNE taka sær av.[57]

154. Talan er um ein rættiliga greiðan fyrispurning. Biðið verður bara um atgongd til radio access netið, allar aðrar tænastur fer ein MVNE at taka sær av. Í sama telduposti bjóðar ráðgevin sær til at koma til Føroyar saman við sínum tekniska stjóra, so hesin og [leiðslupersónurin í Føroya Tele samtakinum]

155. kunna fara í smálutir. Hóast áhaldandi rykkjarar frá ráðgevanum, kemur Føroya Tele ikki við einum svari fyrr enn 28. juni 2016. Tá verður sagt, at Føroya Tele er ikki til reiðar at veita og at felagið hevur ikki MVNO sum hillavøru. Her skal viðmerkjast, at FT Samskifti, ið hevur farnetið um hendi, hevur síðani liberaliseringina av føroya fjarskiftismarknaðinum, havt eina veitingarskyldu. Hóast hetta, er ongin MVNO standardvøra á hillunum tvey áratíggjur seinni.

156. Umboðið metti eisini tað vera ein feil, at Kappingareftirlitið ikki tekur atlit til hvussu langt ella stutt tingingarnar vóru komnar.

157. Kappingareftirlitið metir, at tað er ikki ein fortreyt fyri at staðfesta prísklemmu, at talan er um eitt endaligt tilboð. Ein ráðandi fyritøka skal í sambandi við tingingar tryggja sær, at hon yvirheldur ásetingarnar í §11 í kappingarlógini.

158. Í TeliaSonera[58] dóminum stendur beinleiðis, at fyrimunurin við at brúka ráðandi fyritøkuna sum as-efficient competititor, er millum annað eisini rættartrygdin hjá ráðandi fyritøkuni. Í reglubroti 44 stendur:

> "Furthermore, the validity of such an approach is reinforced by the fact that it conforms to the general principle of legal certainty, since taking into account the costs and prices of the dominant undertaking enables that undertaking to assess the lawfulness of its own conduct, which is consistent with its special responsibility under Article 102 TFEU, as stated in paragraph 24 of this judgment. While a dominant undertaking knows its own costs and prices, it does not as a general rule know those of its competitors (Deutsche Telekom v Commission, paragraph 202)."

159. Hetta reglubrot í dóminum leggur upp til, at ráðandi fyritøkur, sum FT Samskifti, áðrenn eitt tilboð verður latið, eftirkannar um tilboðið er ein prísklemma í stríð við §11. Víðari verður sagt, at hetta vildi verið í tráð við ta serligu skyldu, sum er áløgd eini ráðandi fyritøku sambært rættarvenju.

---

[54] Skjal 22/00186-3
[55] Skjal 22/00186-3
[56] Skjal 22/00186-3
[57] Mobile Virtual Network Enabler
[58] C-52/09

### 2.6.2. Føroya Tele eri ikki ráðandi á viðkomandi marknað

160. Umboðið fyri Føroya Tele greiddi frá, at FT Samskifti var samt við skilmarkingini av viðkomandi marknað fyri MVNO, men er ósamt við Kappingareftirlitinum um, at fartelefoni hald til húski er ein viðkomandi marknaður.

161. Í hesum sambandi sigur umboðið, at Tosa ynskti eina MVNO-avtalu og ikki eitt fartelefoni hald. Hetta mál snýr seg um MVNO og ikki fartelefoni hald.

162. Kappingareftirlitið hevur skilmarkað ein ovara viðkomandi marknað, MVNO avtalur, og ein niðara marknað, fartelefoni hald til húski. Í einum margin squeeze máli er altíð talan um tveir marknaðir, har vøran á tí eina marknaðinum er neyðug fyri virksemið á hinum marknaðinum. Somuleiðis vil ráðandi fyritøkan verða veitari á báðum, meðan kappingarneytar eru kundar hjá ráðandi fyritøkuni á einum marknaði og kappingarneytar á hinum marknaðinum.[59]

163. Kappingareftirlitið hevur valt at gera sína prísklemmu kanning við støði í marknaðinum fyri MVNO-avtalur og marknaðinum fyri fartelefon hald til húski.

164. Tað er rætt, at marknaðurin fyri MVNO-avtalur í Føroyum er marknaðurin, har felagið Tosa eftirspurdi eina MVNO avtalu, men tað er eisini rætt, at FT Samskifti og felagið Tosa fóru at verða kappingarneytar á millum annað marknaðinum fyri farelefoni hald til húski í Føroyum.

165. Umboðið fyri Føroya Tele greiddi frá, at meðan tingingarnar vóru, høvdu bæði FT Samskifti og Nema farnet og tí var talan um ein marknað, har hvør veitari hevði 50%. Tí var ongin ráðandi á markanaðinum fyri MVNO-avtalur í tíðarskeiðinum 2016 til 2017. Umboðið legði afturat, at hetta sannar Kappingareftirlitið í sambandi við skilmarkingina, tí í reglubroti 140 stendur at ein MVNO-avtala frá Nema kann koma ístaðin fyri eina MVNO avtalu hjá FT Samskifti.

166. Kappingareftirlitið metir, at Føroya Tele hevur eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri MVNO'avtalur, grundað á tey viðurskifti, sum víst verður til í parti 3.2.1.

167. Tað er ikki rætt, tá umboð fyri FT Samskifti førir fram, at av tí at tvey farnet eru í Føroyum, so hava P/f Nema og FT Samskifti 50% av viðkomandi marknað í part, og tá fyriliggur ongin ráðandi støða.

168. Í fyrsta lagi er rætt at ein marknaðarpartur omanfyri 50% í sær sjálvum eitt prógv um ráðandi støðu, men hetta merkir ikki, at ein ráðandi støða ikki kann verða tilstaðar, um marknaðarparturin er lægri enn 50%. Vanliga verður sagt, at marknaðarpartur millum 40% og 50% geva ábending um eina ráðandi støðu, men aðrar ábendingar noyðast eisini at vera tilstaðar.

169. Í øðrum lagi skal vísast á, at vanliga verða marknaðarpartar uppgjørdir, grundað á nettusølu, bruttovinning ella innflutningstøl.

170. Umboðið hjá Føroya Tele hevur grundað sína niðurstøðu á, at av tí at tað eru tvey farnet, er marknarparturin á marknaðinum fyri Full-MVNO-avtalur hjá hvørjari fyritøku 50%. Hetta hevur umboðið uttan iva gjørt, tí ongin søla var farin fram á hesum marknað frammanundan. Hetta ger tó ikki háttin minni óvanligan.

---

[59] Sí í hesum sambandi pkt. 2.5.3 hesum tilmæli og 3.2. og 3.3. í fylgiskjali 7.2.

171. At grundað ein marknaðarpart á, at man hevur eitt farnet, tvs. at man hevur framleiðslu kapacitet, sum í grundini er tað sum uppáhaldið hjá Føroya Tele byggir á, má metast at vera ein sera ivingarsamur háttur at staðfesta marknaðarpart eftir.

172. Sum dømi kann nevnast at í avgerð Kappingarráðsins tann 20. apríl 2023 um at Føroya Tele hevði misnýtt eina ráðandi støðu í sambandi við útlutan a gávu,[60] og sum Føroya Kærustovnur staðfesti tann 14. juli 2023,[61] metti Kappingarráðið at P/f FT Samskifti hevði eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri fartelefonhald bunta við talu, sms og data til privat.[62]

173. Hetta var staðfestingin hóast P/f Nema millum annað hevði eyka kapacitet. Tað kundi nevniliga staðfestast at marknaðarparturin hjá P/f Nema var minkaður seinastu mongu árini og kundaskarin hjá P/f Nema var eisini minkaður í veruligum tølum. Hetta var støðan hóast marknaðarvøkstur hevði verið í sama tíðarskeiðinum.

174. Tað er tí greitt at eitt felag kann gott hava kapasitet til, men tað merkir ikki at felagið orsaka av hesum hevur eina marknaðarráðandi støðu.

175. Kappingareftirlitið hevur hinvegin hugt eftir um tað eru onnur viðurskifti, sum geva ábending um eina marknaðarráðandi støðu. Hetta framgongur av parti 3.2.1.

176. Leggjast kann afturat, at farneti hjá P/f FT Samskifti hevur betri dekning enn farneti hjá P/f Nema. P/f Nema hevur 92 basisstøðir, harav áleið 30-40 sum kunna veita 2G, 3G og 4G. Hinar kunna bara veita 2G og 3G. Ítøkiliga merkir hetta at P/f Nema kann veita 4G á øllum landsvegum og størri plássum, men í ávísum bygdum er bert 3G. P/f FT Samskifti hevur munandi fleiri basisstøðir og allar hava 2G, 3G og 4G.

177. Tá samráðingarnar byrjaðu millum umboð fyri Tosa og P/f FT Samskifti var ein national roaming avtala galdandi millum P/f FT Samskifti og P/f Nema. Hon snúi seg um at har sum P/f Nema ikki hevði dekning kundi brúkarar hjá P/f Nema reika inni á netinum hjá P/f FT Samskifti. Avtalan fevndi tó bara um voice og sms. Hetta hevði við sær at brúkarar hjá P/f Nema kundi ávís støð í Føroyum ikki brúka data.

178. Undangongumennirnir handan Tosa høvdu starvsroyndir frá P/f Nema, hóast hetta valdi hesir heldur at byrja tingingar við Føroya Tele, uttan iva tí netið hjá Føroya Tele var betri. Bæði umboð fyri P/f Nema og P/f FT Samskifti hava í øðrum málið yvirfyri Kappingareftirlitinum víst á, at farnetið hjá P/f Nema ikki hevur líka høga góðsku.[63,64]

179. Somuleiðis kann vísast á, at um onki kravið um sambanding í serlóggávuni var avtikið, so vildi farnetið hjá P/f Nema verið virðisleyst, meðan farnetið hjá P/f FT Samskifti vildi verið óavirkað av hesum. Ongin vildi gjørt eina MVNO-avtalu við eitt felag, har felagar bert kundu ringja til 25% av øllum fartelefonum, og har ikki kundi ringast til eitt fastnet nummar. Kundarnir vildu eisini flýggja.

---

[60] Skjal 21/00313-41 Avgerð Kappingarráðsins tann 20. apríl 2023
[61] Skjal 23/00252-10 Avgerð frá 4. juli 2023, Føroya Kærustovnur
[62] Skjal 21/00313-41 Avgerð Kappingarráðsins tann 20. apríl 2023, partur 3.3.4, reglubrot 244
[63] Skjal 22/00185-17 Góðkent fundarnotat við viðmerkingum frá fundi tann 18. januar 2023
[64] Skjal 22/00185-21 Fundarfrágreiðing frá fundi tann 6. januar 2023 millum P/f Nema og Kappingareftirlitið um RAN samstarvið

180. Kappingareftirlitið metir, at omanfyri standandi er orsøkin til, at P/f FT Samskifti ikki ynskti at innganga eina avtalu við umboð fyri Tosa. P/f FT Samskifti var nógv betri fyri at taka kappingina upp á viðkomandi smásølumarknað, um umboðini fyri Tosa gjørdu avtalu við P/f Nema og ikki við P/f FT Samskifti.

181. Undir virknari kapping vildi P/f FT Samskifti verið eggjað til at inngang avtalu við umboð fyri Tosa, soleiðis at man í heilsølu kann varveita nakað av teimum inntøkum, sum man missur í sambandi við nýggja felagið tekur smásølu kundar frá P/f FT Samskifti. Somuleiðis vildi P/f FT Samskifti, undir virknari kapping, verið eggjað til at innganga avtalu við umboðini fyri Tosa fyri, at fáa lut í eimum inntøkum sum komandi felagið vildi fingi í sambandi við yvirtøku av smasølukundum frá P/f Nema.

182. Kappingareftirlitið metir, at tað er onki ivamál um, at Føroya Tele var marknaðarráðandi á viðkomandi marknað fyri Full-MVNO avtalur í 2016-2017.

### 2.6.3. Manglandi heilmild fyri tilmæltu boðunum

183. Umboðið fyri Føroya Tele vísti á, at §22 hevur eina úttømandi uppremsan av boðum, sum kunnu gevast. Boð uttanfyri rammurnar av §22 kunnu tí ikki gevast.

184. Kappingareftirlitið er ósamt við Føroya Tele um, at §22 hevur eina úttømandi uppremsan av boðum. Tað framgongur greitt á greinini, at tað sum stendur í §22, stk. 1, nr. 1-4, eru dømir og ikki ein úttømandi uppremsan.

185. Umboðið vil vera við, at Føroya Tele kann ikki áleggjast at gera eitt standard tilboð um Brand Resale avtalu, tí talan er um eina vøru, sum ikki er partur av viðkomandi marknaði.

186. Tað er rætt, at Kappingareftirlitið hevur skilmarkað viðkomandi vørumarknað sum Full-MVNO avtalur, men í reglubroti 180-182, verður spurningurin til aðrar avtalur enn Full-MVNO avtalur viðgjørdur. Har Kappingareftirlitið kemur til ta niðurstøðu, at uttan mun til um aðrar avtalur, t.d. Brand Resale avtalur, vóru á viðkomandi marknaði, so var marknaðarstøðan hin sama.

187. Kappingareftirlitið metir, at heimild er fyri at geva boð um Brand Resale avtalu, hóast at henda avtala ikki er partur av viðkomandi marknaði. Hetta tí at ein Brand Resale avtala er tann einfaldasti hátturin hjá eini fyritøku á koma inn á viðkomandi niðara marknað.

188. Kappingareftirlitið metir eisini, at avís substitión kann fara fram millum avtalurnar, men tá er tað veitarin, sum velur hetta. Ein heilsøluveitari, sum fær ein umbøn um t.d. ein Full-MVNO avtalu, kann velja at geva tilboð uppá tær veitingar, sum MVNO'arin skal hava frá sínum MNE'ara, fyri at fáa meira burtur úr sjálvur. Verður tikið av tilboðnum, er tá kanska heldur talan um eina medium-MVNO avtalu ella light-MVNO.

189. Kappingareftirlitið metir, at hóast Brand Resale avtalan ikki var partur av viðkomandi marknað, so er hon viðkomandi tá bøtast skal um tann skaða, sum framferðin hjá FT Samskifti hevur havt við sær, tí Brand Resale avtala er einfaldasti hátturin at koma inn á viðkomandi niðara marknað.

190. Í eini støðu har tað er neyðugt at skapa tiltrúgv til at innrás kann fara fram á viðkomand niðara marknað uttan stórvegis váða hevur Brand Resale avtalan stóran týdning.

# 3. Meting

## 3.1. Viðkomandi marknaður

191. Í §5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting[65], útboðsvaraseting[66] og møgulig kapping, skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði. Hetta er fyri at staðfesta í hvønn mun fyritøkan er undir kappingarligum trýsti. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varasetingin í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping skal kannast, um tað er neyðugt. Somuleiðis skal ásetingin skiljast soleiðis, at varaseting skal kannast undir øllum umstøðum, men at aðrir hættir eisini kunnu brúkast.

192. Í sambandi við skilmarkingina av viðkomandi marknaði, skal bæði viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður staðfestast. Hetta merkir, at kanningin skal staðfesta um tað eru aðrar vørur á marknaðinum, sum kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum partarnir veita. Eisini skal landafrøðiliga støddin á marknaðinum staðfestast. Landafrøðiligi marknaðurin er tað øki, har partarnir veita ella avtaka vørur og har kappingarligu umstøðurnar eru so líkar, og sum líkjast frá teimum, sum eru galdandi í grannaøkjum.

### 3.1.1. Viðkomandi vørumarknaður

193. Tað eru tveir viðkomandi vørumarknaðir í hesum málið. Ein ovari marknaður, ið er heilsøla av Full-MVNO tænastur innan fartelefoni. Hesar avtalur fevna um atgongd til radio access net hjá einum kervisveitara. Niðari marknaðurin er smásøla av fartelefon haldum, har bæði veitarar við egnum netið, sonevndir MNO'arir[67], og veitarir uttan egið net, t.d. MVNO'arir, Service Providers, og Brand Reseller kappast um at selja til enda privatar endabrúkarar.

#### 3.1.1.1. Ovari marknaður

194. Ein veitari við eini Full-MVNO avtalu, kann taka sær av øllum tættum innan fjarskiftisveiting, undantikið at eiga og útleiga eitt radionet. Ein Full-MVNO avtala gevur MVNO'inum møguleika at menna egnar fjarskiftistænastur, sum kunna verða heilt ólíkar teimum, sum kerviseigarin sjálvur selur í smásølu.

195. Tað eru aðrar MVNO-avtalur, har kerviseigarin tekur sær av fleiri tættum av fjarskiftisveitingini, men hevur tá eisini størri ræði á MVNO'inum.

196. Kappingareftirlitið ivast í um hesar kunna varasetast fyri Full-MVNO avtaluna. Vanliga fevnir viðkomandi marknaður um tær vørur ella tænastur, sum kundin kann hugsast at velja, um ávísa vøran dýrkar við t.d. 10%. Ein Full-MVNO avtala fevnir bara um atgongd til RAN, meðan hinar fevna um fleiri tænastur frá kerviseigara, tí gevur tað ikki meining, at ein varaseting skuldi farið fram undir slíkum umstøðum.

197. Uttan mun til um viðkomandi vørumarknaður fevnir um bara Full-MVNO, Full-MVNO og Thick MVNO, ella allar MVNO-avtalur, so broytir hetta ikki stórvegis við útboðssíðuna.

---

65 substitution of demand
66 substitution of supply
67 Mobile Network Operator

198. Tað er nevniliga bara P/f Nema og Sp/f Samskifti, sum eiga farnet. Í skrivandi løtu er P/f Nema í gongd við at taka sítt radio net niður. Eftir ætlan fer P/f Nema at skifta yvir til at brúka 5G netið hjá FT Samskifti. Hóast tað sostað bert verður ein kervisveitari innan fartelefoni, so kann verða at P/f Nema framvegis kann veita øðrum atgongd umvegis tað avtalu teir koma at hava við FT Samskifti.

199. Kappingareftirlitið metir, at ein fullfíggjað MVNO-avtala við P/f Nema kann koma ístaðin fyri eina fullfíggjaða MVNO-avtalu hjá P/f FT Samskifti.

200. Kappingareftirlitið metir ikki, at tað er sannlíkt at veitarar frá øðrum marknaðum uppá stutt skotbrá og uttan stórvegis meir kostnað kunna byrja virksemi á ovara marknað. Talan er um rættuligar umfatandi íløgur sum skulu gerast og fleiri avtalur skulu inngangast við verandi partar á marknaðinum.

#### 3.1.1.2. Niðari marknaður

201. Í Føroyum eru tveir smásølumarknaðir innan fartelefoni. Hesir eru søla av fartelefon haldum til húskið og søla av fartelefoni haldum til vinnuna[68]. Kappingareftirlitið hevur avmarkað sína prísklemmu kanning til marknaðin fyri heilsølu av Full-MVNO tænastum innan fartelefoni og marknaðin fyri smásølu av fartelefoni haldum til húsarhald. Orsøkin til hetta er partvís tey viðurskifti sum víst verður á í hoyringssvarinum hjá FT Samskifti og partvís at smásøla til vinnukundar fer fram eitt sindur ørðvísi enn til húsarhald, t.d. kunna tænastur verða buntaðar ymiskt og fyri størri kundar er ofta talan um ítøkiligar samráðiðingar um eina generella telefoniveiting.

202. Í hoyringssvarinum verður róð upp undir, at smásøla av fartelefoni haldum til húsarhald og smásøla av fartelefoni til vinnulívið eru ein og sami vørumarknaður. Kappingareftirlitið er ósamt við FT Samskifti um hetta. Fyrsta kravið í sambandi við eftirsppurningsvaraseting millum vørur[69] er at kundin hevur møguleika til at velja millum vørurnar. Tað er ikki møguligt hjá privatum kundum at fáa sær eitt vinnuhald, tí stovnan av vinnuhaldi fyri fyritøkur krevur sum minimum eitt V-tal og navn á fyritøku.[70] Tað er eisini onnur viðurskifti sum tala fyri, at talan er um ymiskar marknaðir. Millum annað at bæði FT Samskifti og P/f Nema marknaðarføra sum um talan var um tveir ymiskar vørumarknað.

203. Í hoyringssvarinum verður eisini víst á, at prísklemmukanningini ikki fevnir um nøkur eldri hald hjá FT Samskifti og at inntøkur frá hesum haldum átti eisini at verið tikin við. Kappingareftirlitið er ósamt við FT Samskifti um, at hesi hald átti at verið tikin við.

204. Talan eru um eldri hald sum ikki vóru til sølu í 2018. Ein prísklemmukanning snýr seg um at kannað um ein líka effeltivur kappingarneyti vildi klára at rikið sítt virksemi við teimum prísum sum ráðandi fyritøkan bjóðar í heilsølu. Útgangsstøði verður ikki tikið í marknaðarpartinum hjá ráðandi fyritøkuni, men í eini støðu har ein líka effektiv fyritøka trínur inn á marknaðin. Ein prísklemmukanning tekur tí sum meginregla støði í teimum vørum sum ráðandi fyritøkan hevði til

[68] Íroknað almenna geiran
[69] Substitution of demand
[70] Viðurskiftatreytir – Vinna, Føroya Tele, gildiskoma 1. juli 2023.

sølu tá framferðin fór fram. Tað er tí inntøkur og kostnaðir í sambandi við hesar vørur, sum eru tær vørur sum ráðandi fyritøkan bjóðiði út alment, sum innganga í prísklemmu kanningina.

205. Kappingareftirlitið metir ikki, at fyritøkur uppá stutt skotbrá og uttan stórvegis vága kunna trína inn á marknaðin. Málsevni í hesum málið er júst hetta. Hóast ein fyritøka sum FT Samskifti er áløgd við lóg eina veitingarskyldu, so er greitt at seinasta felag sum royndi at fáa atgongd hevði torført við at fáa atgongd og fekk herundir bjóða ein heilsøluprís sum var hægri enn hvat P/f FT Samskifti hevði klára at rikið sítt smásølu virksemi um við.

### 3.1.2. Viðkomandi landafrøðiligur marknaður

206. Kappingareftirlitið metir, at bæði marknaðurin fyri Full-MVNO-tænastur og marknaðurin fyri fartelefoni hald til húskið skulu landafrøðiliga skilmarkast til Føroyar.

207. Radionet eru national og kundar hjá útlendskum fyritøkum, sum reika á føroyskum radioneti, verða álagdar ein serstakan reikingarkostnað.

208. Tað ber tí ikki til at gera eina MVNO-avtalu við ein útlendskan MNO'ara[71], um ætlanin er at virka sum MVNO'ari á einum føroyskum marknað.

209. Í fartelefoni haldum frá P/f FT Samskifti og P/f Nema rindar kundin teir takstir sum eru galdandi innanlanda í Føroyum. Um ein borgari skuldi valt sær ein danskan veitara, so vildi hesin rinda reikingargjald í Føroyum, umframt at telefonnummari vildi verið sett saman av fleiri tølum enn í føroysk telfonnummar hava. Av somu orsøk vildi kundin eldur ikki havt møguleika at fingið sítt verandi nummar til danska veitaran. Kundar hjá P/f FT Samskifti og P/f Nema kunna skifta veitara og framvegis hava sama telefon nummar.

### 3.1.3. Ávegis niðurstøða um viðkomandi marknaðir

210. Kappingareftirlitið metir, at málið fevnir um tveir viðkomandi marknað – ein ovara og niðara marknað. Ovari markaðurin er marknaðurin fyri fullfíggjaðar MVNO-tænastur í Føroyum, og niðari marknaðurin er marknaðurin fyri smásølu av fartelefoni haldum til húskir í Føroyum.

## 3.2. §11 í kappingarlógini

211. Sambært § 11 í kappingarlógini, er ikki loyvt einum ella fleiri fyritøkum at misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu.

### 3.2.1. Ráðandi støða

212. Talan er um eina ráðandi marknaðarstøðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða fyri munagóðari kapping á viðkomandi marknaði, tí nevnda støða gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkaranum.[72]

213. Í lógarviðmerkingunum til § 11 í kappingarlógini verður sagt, at ein marknaðarpartur omanfyri 50% í sær sjálvum er greitt prógv um eina ráðandi støðu. Sambært ES rættarsiðvenju, kann ein marknaðarpartur omanfyri 50% í sær sjálvum verða prógv um ráðandi støðu, um ikki aðrar

---

[71] Mobile Network Opeator, t..e. kervisveitari
[72] Løgtingsmál 110/2006 Uppskot til løgtingslóg um kapping

óvanligar umstøður fyriliggja.[73] Marknaðarparturin millum 40-50% kann saman við øðrum ábendingum verða prógv um eina ráðandi støðu.

214. Kappingareftirlitið metir, at P/f FT Samskifti hevur eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri fullfíggjaðar MVNO-tænastur, tí felagið hevur eitt av tveimum farnetum í Føroyum. Hetta gevur Føroya Tele netup møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkaranum. Í løtuni verður radio access netið hjá P/f Nema niðurtikið og verður P/f Nema væntandi kundi hjá FT Samskifti í sambandi at farið verður yvir til 5G.

215. Farnetið hjá Føroya Tele hevur betri dekning og tí betri góðsku. Føroya Tele hevur fleiri basisstøðir, og allar hava 2,3 og 4G. Umframt at hava færri basisstøðir hava áleið helmingurin av basisstøðunum hjá P/f Nema bert 2 og 3 G. Hetta merkir at P/f Nema bert bjóðar 2 og 3G í ávísum støðum í Føroyum.

216. Síðani frælsisgerðina og fram til 2017 var ein national roaming avtala millum P/f Nema og P/f FT Samskifti. Avtalan fevndi um talu og sms. Avtalan var gjørd fyri at P/f Nema skuldi kunna bjóða fartelefoni í ávísum støðum har felagið ikki hevði dekning, men av tí at avtalan bert fevndi um talu og sms, so vóru tað støð í Føroyum har kundar hjá P/f Nema ikki kundu brúka data.

217. Umboðini fyri Tosa høvdu góða grund til at byrja samráðingarnar við Føroya Tele fyrst, hóast at fleiri av undangongumonnunum høvdu eina fortíð í P/f Nema.

218. Fyri at staðfesta um fyritøku hevur ráðandi støðu er neyðugt at fyritøkan kann virka óheft av kappignarneytum. Fyri at hetta skal bera til skal kappingarliga trýsti frá kappingarneytum ikki verða noktandi. Tað er onki krav um at trýsti ikki skal verða til staðar, men trýsti skal ikki verða nokk til at viðkomandi fyritøka noyðist at taka atlit til kappingarneytan.

219. Kappingareftirlitið metir, at tann góðsku munur sum var millum farnetið hjá P/f FT Samskifti og P/ f Nema og tann einvegis bundinskapur sum P/f Nema hevði til P/f FT Samskifti í sambandi við nationala roaming stuðlar undir at P/f FT Samskifti kundi virka óheft av P/f Nema á marknaðinum fyri MVNO-aftaler.

220. Kappingareftirlitið metir, at P/f FT Samskifti hevur eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri fartelefoni til húskið í Føroyum. FT Samskifti hevur ein marknaðarpart sum er omanfyri 70% og sum er øktur seinastu 5 árini. Støðan hjá einasta kappingarneytin, P/f Nema, er viknað bæði lutfallsliga og í veruligum tølum. Hetta hóast at eftirspurningurin er øktur seinastu árini.

221. Kappingareftirlitið metir, at P/f NET hevur eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri heilsøluavtalur, um atgongd til fastnetið í Føroyum. Fyritøkur sum ynskja at reka smásølu av fartelefoni haldum til húskið noyðast umframt at fáa avtalu í lag við P/f FT Samskifti, eisini at fáa avtalu í lag við FT Net um atgongd til fastnet.

### 3.2.2. Misnýtsla

222. Sambært § 11 stk. 1 í kappingarlógini, er ikki loyvt eini ella fleiri ráðandi fyritøkum at misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu.

[73] AKZO Chemie, mál C-62/86, reglubrotið 60

223. Hugtakið misnýtsla verður ikki skilmarkað í § 11 í kappingarlógini ella í lógarviðmerkingunum til greinina. Ásetingin sjálv ásetur einans, at misnýtsla av ráðandi marknaðarstøðu er ólóglig.

224. Tó stendur í parti C í almennu viðmerkingunum til § 11, at greinin samsvarar við grein 102 í ES sáttmálanum.[74]

225. Hetta merkir, at evropeisk rættarsiðvenja viðvíkjandi grein 102 er viðkomandi tulkingarískoyti í sambandi við tulkingarspurningar eftir § 11 í kappingarlógini.

226. Eftir evropeiskari siðvenju, fevnir hugtakið um atburð, har amboð, onnur enn tey, sum eru vanlig í kapping, verða nýtt og sum hava ta avleiðing, at kappingin verður avlagað.[75]

### 3.2.2.1. Prísklemma (margin squeeze)[76]

227. Ein prísklemma kann fara fram, tá ein fyritøka er ráðandi á einum ovara-marknað[77] og selur eitt týðandi input til kappingarneytar á einum niðara-marknað.[78] Í tílíkari støðu kann ráðandi fyritøkan gera sær dælt av síni ráðandi støðu við at seta høgan prís á ovara-marknað og harvið gera tað torførari hjá kappingarneytum at kappast við ráðandi fyritøkuna á niðara-marknað.

228. Treytirnar, sum skulu verða loknar fyrr enn ein prísklemma er í stríð við § 11 eru:[79]

1. Ávísa fyritøkan skal hava eina ráðandi marknaðarstøðu á einum ovara-marknað,
2. Munurin millum prísirnar hjá ávísu fyritøkuni á ovara- og niðara marknað førir við sær, at ein líka effektiv fyritøka kann ikki verða kappingarfør á niðara marknað,
3. Framferðin skal vera egnað til at avmarka kappingina.

229. Kappingareftirlitið hevur í parti 3.2.1 viðgjørt fyrstu treyt. Niðurstøðan er, at Føroya Tele hevði eina ráðandi marknaðarstøðu á ovara-marknaðinum fyri MVNO-avtalur, tí felagið eigur eitt av tveimum farnetum í Føroyum og hevði eitt mundandi betri farnet

230. Kappingareftirlitið hevur eisini í parti 3.2.1. staðfest, at Føroya Tele hevði eina ráðandi marknaðarstøðu á niðara marknaðinum, sum var fartelefoni hald til húskið.

231. Viðvíkjandi næstu treyt er vert at nevna mál C-52/09 Konkurrensverket v. TeliaSonera Sverige, har hægstirættur í ES fekk tulkingarspurningar viðvíkjandi prísklemmu. Í reglubroti 32 sigur hægstirættur í ES, at munurin millum prísirnar í pkt. 2 er ov lítil um:

> In the present case, there would be such a margin squeeze if, inter alia, the spread between the wholesale prices for ADSL input services and the retail prices for broadband connection services to end users were either negative or insufficient to cover the specific costs of the ADSL input services

---

[74] Løgtingsmál nr. 110/2006
[75] C-85/76 Hoffmann-LA Roche, reglubrot 91
[76] Tær atfingingar um margin squeeze útrokningina í parti 3.2.2.1. hava ikki givið Kappingareftirlitinum orsøk til at broyta henda part av tilmælinum. Ein støðu takan til tær atfinningar sum eru at finna í hoyringsskrivinum eru at finna í fylgiskjali 7.3.
[77] Up-stream
[78] Down-stream
[79] Pinborg, A. & Straton-Andersen, K.H., Konkurrenceloven med kommentarer, 5 udgave, 2022, s. 706

> which TeliaSonera has to incur in order to supply its own retail services to end users, so that that spread does not allow a competitor which is as efficient as that undertaking to compete for the supply of those services to end users.

232. Ein prísklemma er sostatt til staðar, um munurin millum heilsølu- og smásøluprís er negativur ella ov lítil til at dekka teir produktspecifikku kostnaðir, sum ráðandi fyritøka hevur á smásølumarknaðinum.

233. Støðið í eini prísklemmu test, er altíð ein líka effektivur kappingarneyti sum ráðandi fyritøkan. Tað er ein grundleggjandi meginregla í sambandi við úthýsandi prísásetan, at talan skal verða um framferð, sum er egnað til at útihýsa ein líka effektivan kappingarneyta. Í reglubroti 72 í Case 62/86 AKZO Chemie v Commission sigur hægstirættur í ES um eina útihýsandi prísásetan (prísir undir ATC) at:

> "Such prices can drive from the market undertakings which are perhaps as efficient as the dominant undertaking but which, because of their smaller financial resources, are incapable of withstanding the competi-tion waged against them"

234. Sambært ES rættarsiðvenju, tá metast skal um prísvenju hjá eini ráðandi fyritøku er misnýtsla av eini ráðandi støðu, skal slík meting sum meginregla taka støði í kostnaðinum hjá ráðandi fyritøkuni og hennara viðurskifti annars.[80] Serliga tá tað kemur til prísklemmur, er hetta viðkomandi, tí tá kann staðfestast, um ráðandi fyritøkan sjálv hevði megnað at rikið sítt smásøluvirksemi við teimum heilsøluprísum, sum hon bjóðar øðrum.[81]

235. Kappingareftirlitið hevur tí valt at brúka FT Samskifti í testini. Kappingareftirlitið hevur kannað um P/f FT Samskifti hevði kunnað rikið sítt virksemi innan smásølu av fartelefoni til privat við støði í teimum prísum, sum Føroya Tele bjóðaði Tosa. Prísirnir eru frá august 2017 og sum Tosa endaliga noktaði tann 4. september 2017.

236. Kappingareftirlitið hevur í øðrum máli, sum er í gongd, fingið kostnaðarupplýsingar frá Føroya Tele.[82] Við støði í hesum upplýsingum, hevur ráðgevi[83] hjá Kappingareftirlitinum roknað LRAIC uttan kapitalkostnað fyri fartelefoni hjá Føroya Tele. Kappingareftirlitið fekk tann 9. oktober í 2020 upplýsingar um samlaða kostnaðin fyri fartelefoninetið hjá Føroya Tele. Upplýsingarnar vórðu bólkaðar í beinleiðis kostnaðir og óbeinleiðis kostnaðir.

---

[80] C-52/09 Konkurrensverket v TeliaSonera Sverige AB, reglubrot 41
[81] C-52/09 Konkurrensverket v TeliaSonera Sverige AB, reglubrot 42 til 44
[82] Mál 21/00313: Føroya Tele hevur roynt útihýsandi atburð í samb. við at gáva á 100 Gb er latin
[83] Nordic Connect ApS

237. Gula frámerkið í talvuni omanfyri vísir hvat fyri kostnað LRAIC útrokningin tekur støði í. Føroya Tele hevur upplýst, at samlaði kostnaðurin í mun til samlaðu nýtsluna í 2018 var [.....] kr. fyri hvørt GB, og er hetta grundarlagið undir LRAIC útrokningini.

238. Fyri at finna fram til LRAIC, verður hugt eftir hvørjir kostnaðir vilja falla burtur, um fartelefoni varð lokað niður. Teir kostnaðir, sum fella burtur, um lokað verður, hoyra til fartelefoni. Mett er, at flestu kostnaðir fella burtur, um fartelefoni økið verður lokað niður. Tó er nakað av leigu og kostnaður til starvsfólk, sum er eftir.

239. Við støði í hesi kanning varð mett, at LRAIC fyri fartelefoni var [.....] kr. fyri GB í 2018.[84]

240. Talan er um LRAIC uttan kapitalkostnað. Fjarskiftiseftirlitið hevur í januar 2018 mett WACC'in hjá Føroya Tele at verða [.....] % áðrenn skatt.[85]

241. Føroya Tele hevur ikki møguleika fyri at lata Kappingareftirlitinum útgreinaða nýtslu fyri hvørt hald í 2018, tí hesar upplýsingar eru burturbeindar sambært avtalu við Dátaeftirlitið.[86]

242. Kappingareftirlitið fekk tó í øðrum máli[87] nýtsluupplýsingar fyri hvørt hald fyri tíðarskeiðið september 2019 til januar 2020 og metir, at hesar kunna við leiðrættingum brúkast í hesum máli.

243. P/f Tosa hevur yvirfyri Kappingareftirlitinum sagt, at um tingingarnar, sum endaðu í 4. september 2017, ikki endaðu úrslitaleysar, so vildi felagið kunnað byrjað sítt virksemi í 2018. Kappingareftirlitið hevur tí valt at taka støði í kostnaðinum hjá Føroya Tele í 2018 og mettu nýtsluni fyri 2018.

244. Í sambandi við at brúka árið 2018 sum metingarstøði er viðkomandi at spyrja um nýtsla sum stavar frá gávuni, tað vil siga beinleiðis nýtslan av gávuni og økta nýtslan á haldinum orsaka av gávuni skulu takast við ella ikki.

245. Tað sum talar fyri at taka nýtslu sum stavar frá gávuni við er at talan er um veruligu nýtsluni í 2018, meðan tað sum talar ímóti er at gávan var ein óvanlig hending sum førdi til eina óvanliga høga nýtslu í tíðarskeiðinum gávan var í gildið.

246. Kappingareftirlitið hevur tí valt ein leist har tvær prísklemmu útrokningar verða gjørdar. Onnur tekur støði í nýtsluni í 2018, meðan hin tekur støði í eini nýtslu sum um gávan ongantíð var latin í 2018.

247. Veruliga nýtslan í 2018 er funnin við at minkað nýtslutølini sum Kappingareftirlitið fekk fyri september 2019 til januar 2020 við 11%, tí hetta er munurin millum veruligu nýtsluna í 2018 og 2019.

248. Fyri at finna nýtsluna í 2018 uttan gávuna er ein regressión gjørd við støði í nýtsluni frá januar 2017 til mars 2020. Hetta førir við sær at nýtslantølini fyri september 2019 til januar 2020 verða lækkað við 31%.

---

[84] Skjal 22/00186-5: Endalig analysa viðv. LRAIC frá NC
[85] Skjal 22/00526: (Benchmark kanning av sjókaðalprísum hjá P/F Shefa (Nordic Connect) 2018)
[86] Skjal 18/00268-21: (J.E.W.P., teldupostur tann 3. mars 2020)
[87] Mál: 21/00313: Føroya Tele hevur roynt útihýsandi atburð í samb. við at gáva á 100 Gb er latin

249. Næsta stig í útrokningini varð at staðfesta hvørjir kostnaðir vóru við tilboðnum frá Føroya Tele til Tosa. Hesir kostnaðir vóru dekkaðir av tí prísi, sum Føroya Tele bjóðaði Tosa.[88] Hinir kostnaðirnir eru kostnaðir, sum koma omaná MVNO-kostnaðin. Niðanfyri og á næstu síðu er hetta býti:

250. Úrslitið av útrokningini vísir, at um FT Samskifti skuldi brúkt MVNO prísirnar frá Føroya Tele, so vildi LRAIC hækkað úr [.....] kr. pr. GB til [.....] kr. pr. GB. Av teimum [.....] kr. eru [.....] kr. pr. GB prísurin fyri MVNO-tænasturnar[89], meðan [.....] kr. pr. GB er fyri aðrar neyðugar tænastur.

251. Verður gávan tikin við í útrokningina, fella tølini nakað, tí nýtslan er størri.

---

[88] Sí pkt. 18-22

[89] Tað skal viðmerkjast her, er at MVNO taksturin er um nýtslan var 5.000 Gb um mánaðin, ið svarar áleið til 1.666 kundar við eini miðalnýtslu á 3 GB. Hægsti MVNO takstur var [.....]kr./GB. Hetta var fyri eina mánaðarnýtslu á 1.000GB, ið svarar áleið til 333 kundar.

252. Uttan mun til um gávan er við ella ikki, so er LRAIC hjá FT Samskifti sum MVNO millum 55-60% hægri enn veruligi LRAIC sum er [.....] kr. fyri GB.

253. Næsta stig er at kanna um FT Samskifti hevði megnað at rikið sítt smásølu virksemi á einum handilsligum grundarlagi við einum kostnaðarstøði, sum er 55-60% hægri, enn tað í veruleikanum var í 2018.

254. Í talvuni niðanfyri er útrokning gjørd við støði í eini nýtslu, har gávan á 100GB er íroknað. Í næstu rekkju sæst samlaða inntøkan hjá FT Samskifti innan einstøku haldini, sum felagið selur. Inntøkan er funnin við at falda søluprísin á einstøku familjuhaldunum við samlaða talið av einstøku haldunum. Í triðju og fjórðu rekkju sæst kostnaðurin fyri ávikavist talu og data. Kostnaðurin fyri SMS er ikki tikin við, tí nýtslan av hesi tøkni er nær um ongin. Kostnaðurin fyri talu og data er funnin við at falda [.....] kr. við samlaðu nýtsluna hjá hvørjum einstøkum brúkara.

| Hald | Inntøka | Kostnaður við gávu - tala - | Kostnaður við gávu - data - | Munur |
|---|---|---|---|---|
| **Ver 0GB** | 1.445.327 | 372.500 | - | 1.072.828 |
| **Ver 1GB** | 1.236.422 | 301.714 | 21.946 | 912.763 |
| **Ver 6GB** | 8.287.316 | 2.984.147 | 4.070.075 | 1.233.094 |
| **Ver 16GB** | 5.172.768 | 2.500.767 | 8.517.454 | -5.845.454 |
| **Ver 26GB** | 987.939 | 541.477 | 2.951.916 | -2.505.454 |
| **Ver 46GB** | 25.192 | 10.471 | 140.027 | -125.306 |
| **Tilsamans** | **17.154.965** | **6.711.076** | **15.701.418** | **-5.257.529** |

255. Sum tað framgongur av omanfyristandandi, so vildi samlaða virkisøkið fartelefoni til privat givið eitt hall á 5,26 mió. kr.

256. Tilsvarandi útrokning er at finna í talvuni niðanfyri, men við teirri broyting, at støði er tikið í eini nýtslu, har gávan er drigin frá samlaðu nýtsluni í 2018.

| Hald | Inntøka | Kostnaður uttan gávu - talan | Kostnaður - data uttan gávu | Munur |
|---|---|---|---|---|
| **Ver 0GB** | 1.445.327 | 372.500 | - | 1.072.828 |
| **Ver 1GB** | 1.236.422 | 301.714 | 18.123 | 916.586 |
| **Ver 6GB** | 8.287.316 | 2.984.147 | 3.249.812 | 2.053.357 |
| **Ver 16GB** | 5.172.768 | 2.500.767 | 6.720.457 | -4.048.456 |
| **Ver 26GB** | 987.939 | 541.477 | 2.335.620 | -1.889.158 |
| **Ver 46GB** | 25.192 | 10.471 | 111.561 | -96.840 |
| **Tilsamans** | **17.154.965** | **6.711.076** | **12.435.572** | **-1.991.683** |

257. Sum tað framgongur av omanfyristandandi, so vildi samlaða virkisøkið fartelefoni til privat givið eitt hall á 1,99 mió. kr. um P/f FT Samskifti var MVNO-veitari hjá Føroya Tele, men onga gávu hevði givið í apríl 2018.

258. Úrslitini vísa, at ein líka effektivur kappingarneyti sum P/f FT Samskifti, vildi ikki megnað at rikið smásølu innan fartelefoni til privat við heilsøluprísinum hjá Føroya Tele. Leggjast skal afturat, at úrslitini eru uttan kapitalavkast á [.....]% og við [.....] kr./GB sum var lægsti dataprísurin í tilboðnum frá Føroya Tele.

259. Tí er næsta treyt lokin.

260. Í mun til triðju treyt, framgongur av ES dómi C-52/09 reglubrot 64 at:

> It follows that, in order to establish whether such a practice is abusive, that practice must have an anti-competitive effect on the market, but the effect does not necessarily have to be concrete, and it is sufficient to demonstrate that there is an anti-competitive effect which may potentially exclude competitors who are at least as efficient as the dominant undertaking.

261. Sostatt er ikki neyðugt at prógva, at prísklemman hevur havt ein kappingaravlagandi virknað, men neyðugt er at vísa á, at ein kappingaravlaging er tilstaðar, sum kann útihýsa kappingarneytar, sum eru líka effektivir.

262. Í reglubroti 65 í sama dómi verður sagt at:

> Where a dominant undertaking actually implements a pricing practice resulting in a margin squeeze on its equally efficient competitors, with the purpose of driving them from the relevant market, the fact that the desired result, namely the exclusion of those competitors, is not ultimately achieved does not alter its categorisation as abuse within the meaning of Article 102 TFEU

263. Hetta merkir, at tað faktum, at Tosa seinni gjørdi avtalu við P/f Nema, hevur ongan týdning fyri málið, um ein prísklemma er tilstaðar, sum hevur havt við sær eina kappingaravlaging, sum var egnað til at útihýsa líka effektivar kappingarneytar.

264. Í hesum sambandi hevur tað týdning, at fyri Tosa var tað alneyðugt at fáa atgongd til RAN hjá Føroya Tele, fyri at kunna virka sum Full MVNO veitari.[90]

265. Her skal eisini havast í huga, at Føroya Tele er álagt í serlóggávu at geva slíka atgongd á einum handilsligum grundarlagi.

266. Ein prísklemma kann hava við sær, at ein líka effektiv fyritøka ikki kann reka sítt virksemi uttan undirskot ella við ov lítlum vinningi til at kunna reka sítt virksemi á einum handilsligum grundarlagi.

267. Er støðan tann, at munurin millum heilsølu prís og smásølu prís førir til eitt undirskot, so er hetta í sær sjálvum nokk til at vísa á eina kappingaravlagandi ávirkan.[91]

### 3.2.3. Ávegis niðurstøða um misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu

268. Kappingareftirlitið metir at treytirnar fyri kappingaravlagandi prísklemmu eru staðfestar. Føroya Tele hevur virksemi á bæði ovara marknað og niðara marknað og Føroya Tele hevur eina ráðandi støðu á ovara marknað.

269. Kappingareftirlitið hevur kannað um FT Samskifti hevði kunnað rikið sítt fartelefoni virksemi við teimum prísum, sum Føroya Tele bjóðaði Tosa. Sambært útrokningini omanfyri, er munurin negativur. Tað vil siga, at FT Samskifti vildi ikki kunnað rikið sítt fartelefoni virksemi við teimum prísum, sum Føroya Tele bjóðaði Tosa.

---

[90] C-52/09, reglubrot 69-71
[91] C-52/09, reglubrot 73

270. Her skal leggjast afturat, at Kappingareftirlitið hevur ikki íroknað nakað avkast krav í sambandi við LRAIC útrokningina. Í 2018 gjørdi Fjarskiftiseftirlitið eina kanning av prísásetingini á Shefa-kaðlinum. Her metti Fjarskiftiseftirlitið at WACC hjá Føroya Tele var [.....]%.

271. Føroya Tele hevur síðani brúkt hetta avkastskrav í sambandi við prísáseting av tænastum hjá Shefa.

272. Kappingareftirlitið metir tí, at tá tað kemur til avkastskrav eigur støði at verða tikið í einum WACC á [.....]%.

273. Kappingareftirlitið hevur tikið støðu til tær útrokningar sum eru at finna í hoyringssvarinum hjá FT Samskifti (fylgiskjal 7.2) og okkara niðurstøða til hesar eru at finna í fylgjuskjali 7.3.

274. Millum annað framgongur av fylgiskjali 7.3. at ein líka-effektivur kappignarneyti vildi sjálvt ikki við einum marknaðarparti á 75% klára at fingið eina postiva margin við teimum prísum sum FT Samskifti bjóðaði Tosa. Hetta er enntá uttan at avkast til kapitalin á [.....]% er íroknað.

275. Við einum marknaðarparti á 15%, sum kanska vildi verið eitt meira rímuligt mál fyri eina fyritøku at roynt eftir at fáa, vildi sølan verið 8,6 mió. kr., men áðrenn avkast til kapital er úrslitið -1,4 mió. kr.

276. Viðvíkjandi avsláttarskipanini, so er at siga at við einum marknaðarparti á 10% fær ein lika-effektivur kappingarneyti áleið avsláttur av 22% av kostnaðinum og tá marknaðarparturin kemur upp á 15%, so vil kappingarneytin fáa avsláttur av 46% av kostnaðinum. Til samanberingar vildi Føroya Tele fingið avsláttur av 88% av sínum kostnaði.

277. Avsláttarskipanin vildi sostatt gjørt tað ómøguligt hjá einum líka-effektivum kappingarneyta at kappast við FT Samskifti.

278. Kappingareftirlitið hevur tí valt ikki at taka atlit til tær atfiningar sum eru av upprunaligu margin squeeze – testini, tí sjálvt við teimum broytingum sum skotnar eru upp, so vildi ein líka-effektivur kappingarneyti ikki klára at rikið sítt virksemi.

279. Ein broyting vildi eisini kravt at neyðugt var at kannað um avsláttarskipanin var í stríð við § 11 í kappingarlógini.

280. Kappingareftirlitið heldur tí fast við sína margin squeeze útrokning.

281. Framferðin var avmarkandi fyri kappingina, tí Tosa, sum ætlaði at koma inn á marknaðin í 2018, umvegis eina avtalu við Føroya Tele, kom ikki inn á marknaðin fyrr enn í 2022, eftir at hava fingið avtalu í lag við P/f Nema.

282. Kappingareftirlitið metir, at framferðin kann eisini hava skaðað kappingina fram eftir, tí royndin hjá Tosa at trína inn á marknaðin miseydnaðist. P/f Kall (nú partur av Nema) hevði sama trupulleika. Báðar royndirnar at leiga seg inn á farnetið hjá Føroya Tele, eru miseydnaðar.

283. Kappingarráðið kann geva boð fyri steðga eina kappingaravmarking, sbrt. § 11, stk. 4 í kappingarlógini. Sambært serligu viðmerkingunum til greinina kunnu boðini fevna um, at ráðandi fyritøkan skal selja eftir teimum treytum sum Kappingarráðið setur. Lutfall skal verða millum boðið og slag av kappingaravmarking.

284. Eftir serlóggávuni, Ll. nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti við seinni broytingum, er álagt veitarum av fjarskiftiskervum, at veita atgongd til síni kervir á einum handilsligum grundarlagi.

285. Í hesum ítøkiliga málið var klaga til Fjarskiftiseftirlitið, ið gav boð um at fara undir veruligar samráðingar. Sambært umboðum fyri Tosa broytti hetta onki og felagið valdi at slíta samráðingarnar og gera avtalu við P/f Nema.

286. Í sambandi við tingingarnar við Føroya Tele kundi umboð fyri Tosa innheinta standardprísir frá TDC Wholesale. Kappingareftirlitið metir at tað vildi hjálp feløgum sum ynskja eina MVNO-avtalu um størri opinleiki var um prís og treytir.

287. Kappingareftirlitið metir, at eini boð, sbrt. § 11, stk. 4, um at almannakunngera eina standard Full-MVNO avtalu og eina standard Brand Reseller avtalu vil gera tað lættari hjá nýggjum feløgum at koma inn á marknaðin.

## 4. Samlað niðurstøða

- Grundað á omanfyristandandi, metir Kappingareftirlitið at FT Samskifti hevði eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri heilsølu av MVNO-tænastum og at FT Samskifti hevur misnýtt sína ráðandi støðu á viðkomandi marknað sambært § 11, stk. 1 í kappingarlógini við, at seta ein prís fyri Full MVNO-avtalu, sum hevði við sær, at ein líka effektivur kappingarneyti ikki kundi kappast á marknaðinum fyri fartelefoni til privat.

- Kappingareftirlitið metir at tað er neyðugt at geva boð sambært § 11, stk. 4, sbr. §22 í kappingarlógini, um at Føroya Tele skal almannakunngera tvey standardtilboð. Eitt tilboð um eina standard Full-MVNO avtalu og eitt tilboð um eina standard Brand Reseller avtalu.
- Boðini hava ikki við sær at FT Samskifti missur rættin at kappast um prís, samstundis sum boðini tryggja at ein líka effektivur kappingarneyti kann reka sítt smásølu virksemi við tí heilsøluprísi, sum FT Samskifti bjóðar.

## 5. Boð

288. Kappingareftirlitið mælir til, at Kappingarráðið gevur boð, sbrt. § 11, stk. 4 í kappingarlógini um, at Føroya Tele skal á heimasíðu teirra kunngera:

  - Eitt standardtilboð um eina Full-MVNO avtalu,
  - Eitt standardtilboð um eina Brand Reseller avtalu.

289. Tilboðini skulu hava eina útgreining av hvørjar tænastur avtalan fevnir um. Tilboðini skulu góðkennast av Kappingareftirlitinum.

290. Tilboðini skulu verða í gildi í 2 ár eftir at Kappingareftirlitið hevur góðkent tilboðini.

291. Eini boð eftir §22 í kappingarlógini skulu halda lutfallsregluna og tað skal verða greitt hvønn boðini eru til, hvat viðkomandi skal gera ella lata vera við at gera, nær boðini í seinasta lagi skulu vera hildin, og møguliga nær viðkomandi skal hava skjalprógva at boðini eru hildin.

292. Kappingareftirlitið metir at lutfallsreglan er hildin við hesum boðum. Í grundini verður bara álagt FT Samskifti at hava líknandi tilboð, sum kervisveitari á øðrum marknaðum við virknari kapping hava. Hetta verður gjørt fyri at umganga líknandi umstøður, sum vóru í sambandi við tingingarnar

millum P/f FT Samskifti og Tosa, har tað gekk drúgv tíð, áðrenn fyrstu prísirnir komu, og t.d. var data prísurin áleið 3 ferðir samlaða kostnaðin fyri GB. Við at áleggja FT Samskifti at gera slík standard tilboð verður tryggja, at útgangstøðið í tingingunum verður eitt sakliga grundað tilboð, har Kappingareftirlitið frammanundan hevur góðkent treytirnar, herundir prís.

293. Kravið um almannakunngerð er neyðugt fyri at rætta uppá tann skaða sum framferðin hjá P/f FT Samskifti hevur havt við sær á viðkomandi heilsølumarknað, har kappingin longu orsaka av støðuni hjá P/f FT Samskifti, er avmarkað.

294. Ein almannakunngerð av tilboðunum vil skapa størri tryggleika og gjøgnumskygni hjá feløgum sum umhugsa at trína inn á marknaðinum. Tað fer í størri mun at bera til, at meta um teir kostnaðir sum standast av slíkum virksemi.

295. Í skrivandi stund er P/f Nema í gongd við at taka sítt radionet niður og fremja broytingar soleiðis at felagið kann gerast kundi hjá P/f FT Samskifti á nýggja 5G netinum. Hóast hetta, so er ein møguleiki fyri at P/f Nema framvegis fer at selja í heilsølu.

296. Kappingareftirlitið metir tó ikki, at boðini til P/f FT Samskifti kunna køva heilsølukappingini, tí talan er um tilboð har hámarksprísur er settur. Hámarksprísurin verður settur fyri at tryggja at heilsøluparturin ikki kann taka monopolvinning, men bert ein vinning sum gevur fulna fyri kostnað og íroknað ein rímuligan vinning.

297. Tað fer framhaldandi at verða møguligt hjá P/f FT Samskifti at bjóða lægri prís, umframt betri ella ørðvísi treytir enn tær sum eru í standard tilboðinum og harvið kappast við P/f Nema.

## 6. Kæruvegleiðing

298. Henda avgerð kann innan 4 vikur eftir móttøku av hesum skrivi kærast til Føroya Kærustovn, undir Hornabakka, postsmoga 45, FO-110 Tórshavn, sbrt. §32, stk. 2 í kappingarlógini.

299. Viðvíkjandi kærum, verður annars víst til kapittul 8 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingarráðið

Heri Joensen
formaður

Terje Sigurðsson
deildarstjóri